# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Nr. 23 - Apríl 2015



## Annfinnur Garðalíð: Betri sáttmálar er málið

## Føroyar hýsa dálkandi skipum

## Maskinmeistarafelagið: Myndugleikarnir lækka førleikastøðið

## Aðalfundur í maskin- meistarafelagnum

ODDAGREIN

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið

**Blaðnevnd**
Annfinnur Garðalíð, ábyrgd
Páll Hansen
Jóan Petur Patursson
Elias Zachariassen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Føroya Skipara- & Navigatørfelag**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**Blaðhald**
Tey sum ynska at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í tekdupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst. MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**Forsíðumynd**
Gassatangaskipið Meridian Spirit í Nólsoyafirði. Mynd: Anna Katrina Højgaard

**Umsiting og redaksjón**
**Press:** press@press.fo,
Øssur Winthereig, ossur@press.fo
tel. 218486
Ingolf S. Olsen, ingolf@press.fo
tel. 225077
Grækaris D. Magnussen, grakaris@press.fo
tel. 514444

**Umbróting,**
Jan Jacobsen, Prenta

**Prent og liðugtgerð**
Prenta 35 77 74

Upplag: 1900




Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum og limur í blaðnevndini. *Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Mið & Magn í nýggjum hami

Nú er ein tíð fráliðin, síðan seinasta Mið og Magn kom út, men vit eru á lívi enn. Nakað fyri jól í fjørð, tók blaðnevndin ta støðu, at vit vildu endurskoða blaðútgávuna, nú knapt fimm ár vóru liðin, síðan fyrsta blaðið kom út. Ymiskt var, sum vit vildu hava broytt.

Semja var tó um at bíða til eftir aðalfundin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, áðrenn nøkur verulig endurskoðan og umskipan av blaðnum fór í gongd. Tann nýggja blaðnevndin bleiv samd um at heita á fríyrkisfelagið PRESS um at átaka sær uppgávuna at gera blaðíð. Skjótt varð arbeitt, og longu 19. februar varð avtala skrivað undir við PRESS, sum er mannað við trimum útbúnum journalistum. PRESS kemur frameftir at taka sær av øllum arbeiðinum í samband við blaðútgávuna. Avtalað er, at tað koma trý bløð út í ár, men í komandi árum verða tað fýra bløð árliga.

Uppgávan hjá blaðnevndini frameftir verður í samstarvi við PRESS at hava seinasta orðið um innihaldið í blaðnum. Innihaldsliga fer meira at verða gjørt við journalistiska viðgerð av nógvum ymiskum evnum, ið onkursvegna hava áhuga hjá limunum í Maskinmeistarafelagnum og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Talan verður bæði um relevant fakfelagstilfar, fakligar greinar og lættari tilfar. Eisini er sett út í kortið so lýðandi at broyta, snøgga og nútímansgera grafiska sniðið á blaðnum, og hetta skuldi helst borið til at fingið eyga á longu í hesum fyrsta blaðnum, sum nýggi veitarin hevur staðið fyri. Limir í feløgunum báðum eru vælkomnir at koma við hugskotum til blaðgreinar og senda viðkomandi tilfar til redaksjónina at meta um. Kontaktupplýsingar hjá PRESS standa í kolofonini úti í vinstru her á síðuni.

Vegna blaðnevndina

**Páll Hansen**
Formaður í Maskinmeistarafelagnum































# INNIHALD


4 **Aðalfundur hjá Maskinmeistarafelganum**
Val á skránni

14 **Annfinnur Garðalíð**
Nýggur formaður hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

16 **Maskinistútbúgvingin**
Stórur tørvur á maskinistum og motorpassarum

19 **Ein rødd á sjónum**
Jóhan Weihe er einsamalt sjófólk í nevndini í Maskinmeistarafelagnum

20 **Myndugleikarnir lækka standardin**
Broytingar í manningarlógini

23 **Fótonglar fyri innliti**
Manningarfeløgini fáa ongar upplýsingar um avreiðingarprís

23 **Sáttmálasamráðingar**
Feløgini samráðast enn

24 **Prógvhandan**
Prógvhandanir vóru í januar og mars

28 **Andreas Poulsen**
Nýggjur formaður í Antares

30 **Ein fongur fyri samfelagið**
Magni Laksáfoss hevur kannað búskaparárinini av føroysku arbeiðsmegini uttanlands

32 **Minningarorð um Regin Nónstein**
Andlát

34 **Føroyar hýsa dálkandi skipum**
Útlendsk skip koma til Føroya at bíða eftir farmi, tí markvirðini fyri dálking eru lægri her

35 **Norrøna fremst í heiminum**
Norrøna hevur saman við øðrum ment eina skipan at reinsa svávul úr roykinum

36 **Nógv lýtir umborð á Anitu**
Eftirlitsvitjan avdúkaði hópin av feilum

38 **Brennidepilin**
Jóhan Weihe , nýggjur nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum

40 **Brot úr Dagbók**
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum

41 **Brot úr Dagbók**
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum

42 **Føðingardagar**

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Tá Jóhan Weihe var heimkomin, helt nýggja nevndin sín fyrsta fund, har hon eisini skipaði seg. Úr vinstru eru tað Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum, John Højsted, nevndarlimur, Páll Hansen, formaður, Jóan Petur Patursson, nevndarlimur, Regin Olsen, næstformaður, og Johan Weihe, nevndarlimur.

# Dystur um nevndarsess

**Alsamt fleiri maskinmeistarar arbeiða í dag í frálandavinnuni, og á aðalfundinum stillaðu meistararnir hjá Team Beredskap eitt umboð upp til nevndina. Royndin eydnaðist, og Johan Weihe er nývaldur í nevndina, meðan Jón F. Johansen er fyrsti tiltakslimur.**

Aðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum varð hildin á Østrøm í Havn 7. mars.

Páll Hansen var afturvaldur í formanssessin uttan mótvalevni, men størri spenningur varð um nevndarvalið.

Regin Olsen og Jón F. Johansen stóðu fyri vali og stillaðu báðir uppaftur. Men á aðalfundinum stillaði Henry Christiansen sum umboð fyri maskimeistararnar hjá Team Beredskap eisini Jóhan Weihe upp.

Team Beredskap er undirfelag hjá norska reiðarínum Simon Møkster Shipping, og eru skipini hjá felagnum skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS.

Jóhan Weihe var umborð og tók sostatt ikki lut í aðalfundinum, men Henry Christiansen legði dent á, at talan var ikki um ónøgd við verandi nevnd, men at so nógvir limir í Maskinmeistarafelagnum í dag arbeiða í frálandavinnuni, at teir tí høvdu gjørt av at royna at fáa ein av teirra valdan í nevndina.

Úrslitið bleiv, at Regin Olsen var afturvaldur, og Johan Weihe vann hin nevndarsessin.

Jón F. Johansen varð síðani valdur sum fyrsti tiltakslimur og Petur Egholm sum annar tiltakslimur.

Eftir aðalfundin hevur nevndin skipað seg aftur. Páll Hansen, formaður, hevur samskipan, SEV og IRF, norðurlendsk/altjóða arbeiði og Grønlands Arbejdsgiverforening, GA, sum málsøki. Regin Olsen heldur fram sum næstformaður og hevur almenn størv á sjónum sum málsøki, John Højsted, nevndarlimur, hevur fiskiskip sum málsøki, Jóan Petur Patursson, nevndarlimur, hevur privat/alment lønt á landi og smá handilsskip sum málsøki, og nývaldi nevndarlimurin Jóhan Weihe hevur Handilsskip, FAS og FMU sum málsøki.



**Henry Christiansen** stillaði burturstadda Jóhan Weihe upp og greiddi frá, hví føroysku meistararnir hjá norska Team Beredskap fegin vildu hava eitt umboð valt í nevndina í Maskinmeistarafelagnum.



**Petur Egholm** varð valdur sum annar tiltakslimur.



**Jón F. Johansen** hevði sitið í nevndini í tvey ár, men var ov stuttur á nevndarvalinum hesaferð. Hann varð í staðin valdur sum fyrsti tiltakslimur.



**Regin Olsen** greiddi frá, hví hann bjóðaði seg fram til enn eitt valskeið í nevndini og varð afturvaldur.



**Páll Hansen**, formaður í Maskinmeistarafelagnum, ynskti Regini Olsen tillukku við afturvalinum og takkaði Jón F. Johansen fyri gott samstarv.



**Sjúrður Heinesen**, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum, var fundarstjóri.

myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*




Hóast okkurt nosið var, kundi Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, í sínari formansfrágreiðing staðfesta, at 2014 sum heild var eitt friðarligt ár hjá felagnum.

# Formansfrágreiðingin um árið 2014

Páll Hansen kom víða um og nam við nógv viðurskifti í síni formansfrágreiðing, sum her er endurgivin eitt sindur redigerað og stytt.

**Fiskiflotin**

Manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag høvdu ætlanir um at brúka 2014 til at endurskoða allar felagsreglurnar. Nakrir fundir vóru hildnir, men feløgini komu tíverri ikki á mál við hesum. Sum heild kann sigast, at árið 2014 var sera friðarligt.

Nakað av rumbli var um ólavsøkutíðina, tá "Asbjørn Senior" kom undir føroyskt flagg.

Hesir trupulleikar blivu loystir, og reiðaríið gjørdi sáttmála við manningarfeløgini, sum er tann sami, sum er við Reiðarafelagið fyri fiskiskip.

Her fingu manningarfeløgini góða hjálp frá fakfeløgum á landi, og eru vit takksom fyri tað. Hetta vísti eitt sera gott samarbeiði millum manningarfeløgini og feløg á landi.

Um ólavsøkumundið bleiv eisini gjørdur ein sáttmáli millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag um flutningsskip. Hetta er fyrsti sáttmáli av hesum slag.

Í oktober byrjaðu fyrireikingarnar hjá Maskinmeistarafelagnum at gera upplegg til samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag, og vóru vit klárir í góðari tíð, men reiðarafelagið ynskti at fáa sáttmálan longdan fram til 1. mars, og orsøkin var, at teir vóru nógv upptiknir av fiskivinnusamráðingum við onnur lond. Hettar bleiv eftirlíkað. Striltið gekst at fáa byrjan á samráðingarnar, men 19. januar kom gongd á.

Manningarfeløgini samráðast hvørt sær, men Maskinmeistarafelagið hevur boðað frá, at vit gjarna vilja samráðast saman, har tað letur seg gera, millum annað um felagsreglurnar. Man má virða, at feløgini eru trý sjálvstøðug feløg, sum í fleiri førum hava hvør síni áhugamál.

Samráðingarnar hava fyri okkara viðkomandi gingið væl higartil.

Men snávingarsteinar eru á leiðini, sum vit ikki beinleiðis fáa gjørt nakað við, og vit eiga ongan av teimum. Hesir forða fyri skilagóðum samstarvi millum feløgini.

Tað finnast einstakir reiðarar í dag, sum hava ein løgnan hugburð. Teir siga, at teir gera individuellar avtalur við hvønn einstakan mann. Teir fylgja ikki nøkrum sáttmála.

Teir tekna sjálvir trygging fyri síni starvsfólk/manning (tryggingargjaldið verður tikið av hýruni), og teir rinda starvsfólkunum fasta hýru/løn,

heldur fram á næstu síðu >

har eftirlønin er innroknað, soleiðis at starvsfólkið sjálvt avgerð, um teir spara upp til eftirløn, ella ikki.

Menn, sum gera slíkar avtalur, skilja ikki, at um hettar heldur áfram, so ganga bert fá ár, til reiðararnir fara at trýsta hýrurnar niður hjá teimum, sum hava hesar individuellu avtalurnar.

Vit síggja eisini onkutíð onkran av hesum - sokallaðu "fortel tað ikki fyri nøkrum avtalum".

Vit vildu ynskt, at menn, sum gera individuellar avtalur, høvdu ráðført seg meira við felagið, enn tað verður gjørt í dag. Vit eru til tað sama og hava eisini tagnarskyldu.

**Reiðarafelagið fyri Farmaskip**

Hesin sáttmálin bleiv uppsagdur síðst í november til at fara úr gildi 1. mars. Samtundis bleiv sáttmálin við Sandgrevstur, Frakt og Sand, Sekstant og NA-Transport uppsagdur. Høvuðsmálið í okkara sáttmálakrøvum hevur nú í nøkur ár verið, at sáttmálin betri avspeglar tað veruliga lønarlagið í vinnuni, og at støðið verður tað sama sum í okkara grannalondum.

Eg haldi, at eg tori at siga, at bruttolønin á skipunum í FAS er so at siga ájøvn við lønarlagið í okkara grannalondum. At stórur munur er á nettolønini, er av orsøkum, sum feløgini ikki ráða yvir.

Orsakað av, at sáttmálasamráðingarnar fyri fiskiskip blivu so nógv seinkaðar, komu vit ikki í gongd fyrr enn í februar við hesar samráðingar.

Okkara krøv vóru ikki ógvuslig, men sera realistisk. Krøvini frá Føroya Reiðarafelag vóru heldur ikki nakað, man østi seg upp um.

Orsøkin til hetta er helst tann serliga støðan, sum er í frálandavinnuni í løtuni, har lønarhækkingarnar ikki eru nakað at reypa av.

Vit síggja tíverri, at við tí fallandi oljuprísinum eru tað alt fleiri oljufeløg, sum taka seg úr verkætlanum ella útseta boriloyvi, og hettar hevur ávirkan. Síðsti sáttmálin fyri skipini undir NOR var 2,8 prosent í tvey ár. Samráðingarnar um NIS-sáttmálan, sum skuldu byrja í januar í ár, blivu útsettar til í mai orsakað av keðiligu støðuni innan hettar økið.

Men okkara samráðingar gingu væl, og longu 12. februar komu vit til eina ávegis semju, sum við smávegis broytingum bleiv undirskrivað 18. februar.

Tað bleiv ein tvey ára sáttmáli við eini lønarhækking uppá 4,23 prosent hesi árini.

**Strandferðslan**

Árið 2014 hevur mest gingið við, at Strandfaraskip Landsins, SSL, hevur gjørt nýggjar arbeiðsætlanir, soleiðis at hvílutíðarreglurnar kunnu haldast umborð á øllum skipunum.

Flestu farleiðirnar koma uppá fullan brøk í 2016.

MF hevur havt hesar arbeiðsætlanir til hoyringar, og serliga umborð á Smyrli hevur hettar ført til broytingar. Samráðingar verða ikki aftur her fyrf enn í oktober 2016.



myndir: **INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*

Stutt fyri jól í fjør komu boð frá SSL um, at siglast skuldi jóladag. Hetta var sera óheppið, tá jóladagur ikki er innroknaður i fastlønarskipan. Manningarnar høvdu tó onki í móti at sigla hendan dagin, bara lønarspurningurin varð avgreiddur.

Fíggjarmálaráðið boðaði til fundar 16. desember, og feløgini góvu á hesum fundi Fíggjarmálaráðnum eitt uppskot um sigling jóladag.

Vit høvdu tá góðar vónir um eina semju, men Fíggjarmálaráðið bað um umhugsunartíð. Tá svarið kom, var vent í holuni, og tá bar onki til.

Feløgini noktaðu síðani sínum limum at sigla jóladag. Lønardeildin kærdi hesa avgerð til Fasta Gerðarrætt har teir fingu viðhald í, at tiltøkini hjá manningarfeløgunum vóru óheimilað stríðsstig.

Feløgini gjørdu av at leggja málið fyri Fasta Gerðarrættin aftur, og at SSL skuldi viðurkenna, at skipini hjá SSL ikki eru fevnd av sigling jóladag, páskadag og langafríggjadag. Maskinmeistarafelagið hevur útrokningar og yvirlit, sum SSL hevur gjørt, og sum greitt vísa, at jóladagur og langafríggjadagur ikki eru tiknir við í útrokningunum og ikki nevndir í yvirlitinum.

SSL hevur ført fram, at allir halgidagar eru roknaðir við í føstu lønini. Vit hava sagt, at fyritreytin fyri hesari sáttmálaáseting er, at talan var um teir halgidagar, sum siglt varð, tá sáttmálarnir blivu gjørdir og eftir tágaldandi ferðaætlan.

Tosað hevur verið um leingi, at strandfaraskipini skulu sigla allar dagar á árinum.

Í fíggjarlógini fyri 2015 stendur millum annað at lesa viðvíkjandi Strandfaraskipum Landsins: "Miðað verður eftir at sigla allar dagar í árinum í 2015, tó við skerdari ferðaætlan". So á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 eru játtaðir pengar til at sigla hesa dagar. Í 2014 løgdu andstøðupolitikarar eisini fram uppskot um, at siglast skuldi jóladag, langafríggjadag og páskadag. Teir skrivaðu millum annað: "Ynskiligt er at fáa játtan til hesar tríggjar dagar aftrat og at fáa hesar dagar inn í samráðingar við fakfeløgini. So tað er umráðandi at hava fakfeløgini við".

Her framgongur tað týðiliga, at løgtingsmenn eru samdir um, at hesir dagar ikki eru innroknaðir í núverandi sáttmála.

**Vørn**

Sáttmálin fyri skipini hjá Vørn bleiv sera drúgvur at fáa uppá pláss. Hesin gekk út 1. oktober 2013, og vit kommu heilt fram til september 2014, áðrenn ein semja var undirskrivað millum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Semjan gekk millum annað út uppá, at sáttmálin bleiv skrivaður undir at galda fram til 2017, men tey krøv, vit settu í 2013, blivu gingin á møti.

Vit høvdu níggju samráðingarumfør, har onki spurdist burtur úr. Orsøkin var, at ikki fekst svar frá landsstýrismanninum. Fundur var eisini beinleiðis við landsstýrismannin, har hesin lovaði at seta seg inn í málið, men onki spurdist burtur úr. Ikki fyri enn vit hóttu við at klaga til løgmann og løgtingsins um-



heldur fram á næstu síðu >



boðsmann, kom skundfundur í lag, og tá bleiv málið loyst eftir bert 10 minuttum. Tað er beinleiðis skomm, at ein landsstýrismaður kann uppføra seg soleiðis, og púra óneyðugt.

**SEV/alment lønt á landi**
Hesir sáttmálar ganga út 1. oktober og fara at verða uppsagdir, so er tað nakar sum situr við góðum hugskotum, so er bert at koma við teimum í góðari tið.

**FMU**
Útlendsk reiðarí eiga meira enn 50 prosent av bruttotonnasjuni í FAS, og er hettar orsøkin til, at vit framhaldandi eru á FOC-listanum, og tað verða vit í rúma tíð frameftir.

Tað eru sviar sum eiga ta størstu bruttotonnasjuna í FAS.

Tað eru nøkur føroysk reiðarí, sum hava skip undir fremmandum flaggi. FMU hevur boða ITF frá, at vit hava samráðingarrættin fyri hesi skip, og vit hava víst á IMO-nummurini hjá hesum skipum.

Vit hava tó enn ikki frætt aftur frá ITF, men halda áfram, til vit fáa nøktandi svar. Í nøkrum havnum vita ITF-inspektørarnir ikki, at FOC-lýsingin ikki umfatar tey skip, sum hava føroyska manning undir føroyskum sáttmálum, og hetta hevur ført til ávísar trupulleikar.

**NMF**
Tveir fundir hava verið hildnir í felagsskapinum NMF síðan síðsta aðalfund. Ein í Helsinki 5. og 6. mai og hin í Stockholm 15. og 16. september. Á fundinum í Helsinki bleiv tosað nakað um, hvørjar avleiðingar ratifisering av MLC 2006 hevur havt.

Semja var um, at sjófólk nú hava somu mininumsrættindi á fleiri grundleggjandi økjum, eitt nú viðvíkjandi trygdarviðurskiftum. Frá Noregi bleiv upplýst, at MLC-reglurnar eru orsøkin til, at tveir maskinmeistarar nú eru kravdir umborð á norskum fiskiskipum yvir 750 kW. Dømi bleiv nevnt um, at norskur reiðari hevði fingið eina kvart millión krónur í bót fyri ikki at fylgja hesum reglum.

Tað bleiv eisini víst á, at ein persónur kann nokta at yvirtaka eina vakt, um hann heldur, at hann ikki hevur fingið nokk av hvíld.

Á fundinum í Stockholm løgdu limalondini sínar landarapportir fram, og nakað av kjaki var um tær ymisku rapportinar.

Íslendingar søgdu millum annað, at útlendingar við Íslendskum skipum skuldu hava íslendskt vinnubræv, hýru sum íslendingar, og teir skuldu hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Íslandi, áðrenn teir kundu mynstra við íslendskum skipi.

Næsti fundur verður í Keypmannahavn í apríl, og tá hava vit eisini eina rástevnu á Christiansborg fyri norðurlendskum politikarum og myndugleikum, har vit varpa ljós á útbúgving og gransking innan maritima økið í Skandinavia/Norðurlondum.

**Tryggingarfelagið Lív**
Fyrsta apríl eru trý ár liðin síðan fakfeløgini fóru undir eina tilgongd at keypa Lív.

myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*




Úrslitið av nevndarvalinum verður kunngjørt.

Eitt ótal av fundum hava verið hesi trý árini. Seinastu tíðina hevur tilgongdin verið spakulig, meðan arbeitt verður við at fáa greiðu á almenna partinum av lívstryggingarfelagnum.

Tá tann parturin er avgreiddur, verður keypstilgongdin uppafturtikin.

**Útbúgving**

Yvirskipað kann sigast, at sjónarmiðið hjá felagnum viðvíkjandi maskinmeistaraútbúgvingini er, at hon skal liggja á einum sera høgum altjóða støði og væl omanfyri øll minstukrøv. Tað er týdningarmikið fyri okkum, at tað høga støðið verður varðveitt, og at vitanin blívur ment. Royndir at lækka støðið vilja verða møttar við mótstøðu frá felagnum.

Føroyskir og danskir maskinmeistarar hava eitt sera gott umdømi bæði nationalt og internationalt. Ein av orsøkunum til hettar er, at nógv el-læra er í útbúgvingini.

Felagið roynir at gera sína ávirkan galdandi í Útbúgvingarráðnum. Millum málini, sum serliga hevur verið arbeitt við í 2014, er starvsvenjing umborð á skipi (aspirantskipan).

Uppskot til kunngerð um starvsvenjing umborð á skipi er komin.

Annað mál, sum arbeitt hevur verið við, er dagføring av dugnaskapsroyndini í motorlæru og at fáa hesa frálæru sum dagskeið á Vinnuháskúlanum. Skeiðið er í dag 160 tímar á kvøldskúla. Tað sær tó ikki út til, at Mentamálaráðið vil verða viðspælari her. Samanumtikið haldi eg, at Mentamálaráðið hevur verið sera negativt í hesari tilgongd.

Mál, sum standa á skránni fyri 2015, eru millum annað upptøkutíttleiki av maskinistum, bachelor-útbúgving og yvirskipaður politikkur viðvíkjandi eftirútbúgvingum.

Upptøkutíttleikin til maskinistútbúgvingina er eitt mál, sum Maskinmeistarafelagið hevur sett á skrá.

Tá skúlin var við Krákugjógv, bleiv ein flokkur tikin inn um árið. Í tí samanlagda skúlanum bleiv hettar til hálvt annað ár ímillum upptøkurnar. Orsøkin til tað var sparingar, bleiv sagt úr Mentamálaráðnum og av skúlaleiðsluni. Ein upptøkutíttleiki á tvey ár hevur eisini verið uppi og vent.

Maskinmeistarafelagið ynskir at fáa upptøkutíttleikan á beint aftur, so tað verður ein flokkur árliga.

**Sjóvinnustýrið**

Sjóvinnustýrið er í holtur við at endurskoða manningarlógina. Orsøkina til, at Sjóvinnustýrið hevur tikið hettar stig, siga tey vera, at tørvur er á at dagføra krøvini til førleika, soleiðis at tey eru í samsvar við veruleikan og tær útbúgvingar, ið verða útbodnar.

Ein av hesum broytingum er, at sjófólk við dugnaskapsroynd í motorpassing skulu hava rættindi til motorar upp til 749 kW.

Í januar kom so uppskotið til løgtingslóg um manning av skipum til hoyringar. Tá hevði Vinnumálaráðið tengt lækkan av framtøkumegi uppí uppskotið.

Maskinmeistarafelagið hevur í hoyringsskrivi mótmælt hesum. Vit hava millum annað víst á, at her er talan um víðfevndar broytingar og slakingar viðvíkjandi maskinmanning við føroyskum skipum, og at felagið á ongan hátt er kunnað um

hetta arbeiði og enn minni spurt eftir ráðum ella vegleiðing í samband við tilgongdina.

Hetta er eftir okkara tykki ein sera ódámlig og ódemokratisk mannagongd.

Viðvíkjandi dugnaskapsbrævi í motorlæru hevur felagið boðað frá, at vit taka undir við, at "Motorpassari" verður broytt til "Dugnaskapsbræv í motorpassing".

Men vit taka als ikki undir við, at donsk "Dueligshedsbevis i motorpassing" verða líkastillað við tey føroysku. Her hjá okkum er frálærutíðin 160 tímar, og tað verður hugsað um at leingja hana til 200 tímar, júst fyri at tryggja, at skip undir 750 kW eru forsvarliga mannað.

Danska útbúgvingin er 10 dagar, prófdagur íroknaður, og hevur sostatt munandi lægri tímatal.

**Eftirlit**

Maskinmeistarafelagið hevur í 2014 víst á brot á lóggávu um manning og mynstring við fiskiskipum við atliti til maskinmanning. Vit kunnu eisini staðfesta, at tað ólógliga virksemið heldur fram. Eisini hava vit sæð, at samstarvið millum Sjóvinnustýrið og Vørn ikki er á einum positivum støði. Her eru vit á vandakós, tí myndugleikin ger onki við staðfest lógarbrot, tvørturímóti verður arbeitt við at legalisera tey

**Mið og Magn**

Meiningin var, at Mið og Magn skuldi koma fýra ferðir í 2014, men tíverri bleiv tað bara til tríggjar ferðir. Nakað fyri ársskiftið gjørdi blaðnevndin av at umskipa blaðútgávuna og hevur síðan gjørt avtalu við "PRESS" um blaðútgávu. Persónarnir aftan fyri PRESS eru Ingolf S. Olsen, Øssur Winthereig og Grækaris D. Magnussen, og fara teir at taka sær av øllum arbeiðnum frameftir.

Uppgávan hjá blaðnevndini frameftir verður at finna fram til, hvat innihaldið í blaðnum skal vera.

**Skrivstovan**

Tað dagliga arbeiðið á skrivstovuni gongur fyrimyndarliga væl. Felagið er væl fyri fíggjarliga, og roknskapurin sær skilagóður út.

Í 2014 eru húsini hjá felagnum blivin málað uttan, og eisini er gjørt nakað av fríðkan uttandura. Arbeiðið við at fríðka økið fer helst at halda fram, so hvørt fólk fær góð hugskot.

Páll Hansen endaði sína formansrøðu við at leggja dent á, at endamál felagsins er áhaldandi at styrkja og verja limanna rættindi og kor, og at hetta altíð vil verða stavnhaldið.



Nevndarborðið á aðalfundinum. Úr vinstru eru teir Sjúrður Heinesen, fundarstjóri, Páll Hansen, formaður, Regin Olsen, næstformaður, Jón F. Johansen, fráfarandi nevndarlimur, Jóan Petur Patursson, nevndarlimur, og John Højsted, nevndarlimur.

myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



**Páll Hansen** svaraði spurningum og viðmerkingum eftir formansfrágreiðingina.

# Spurningar og viðmerkingar

**Formansfrágreiðingin hjá Pálli Hansen var góðtikin uttan hóvasták, men onkrir spurningar og viðmerkingar vóru í orðaskiftinum aftaná.**

Páll Hansen kom víða um í síni formansfrágreiðing, og treyðugt so fekk hon onkrar viðmerkingar, áðrenn aðalfundurin tók hana til eftirtektar, og onkrir spurningar skuldu svarast.

Millum annað varð formaðurin spurdur, hvat felagið gjørdi fyri at sleppa limum sínum undan at gjalda tilfeingisgjald. Her vísti Páll Hansen til felagsreglurnar í sáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag, har grein 17 um frádráttir hevur verið tulkað soleiðis, at tilfeingisgjald er loyvdur frádráttur, og á ein gerðarrættarúrskurð, sum sigur, at manningar skulu vera við til at rinda fyri kvotur, sum eru keyptar á uppboðssølu. Formaðurin gjørdi tó eisini greitt, at Maskinmeistarafelagið ongantíð hevur góðtikið, at manningar skulu taka lut í tilfeingisgjaldinum.

### Ósemja um eykapartar

Onkrir spurningar vóru eisini til sáttmálasamráðingarnar, sum nú eru við Føroya Reiðarafelag um fiskiflotan. Her fekk Páll Hansen vegna virðing fyri mótpartinum ikki sagt so nógv. Hann segði tó, at orsøkin til, at Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag ikki samráðast saman, er ósemja millum feløgini um eykapartarnar. Páll Hansen segði, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag millum annað hevur kravt, at eykaparturin hjá einum fyrstastýrimanni skal liggja ájavnt og helst omanfyri eykapartin hjá einum maskinstjóra, og hetta kann Maskinmeistarafelagið ikki góðtaka.

### Løn og eftirløn

Orðaskifti var eisini um býtið millum løn og eftirløn í sáttmálasamráðingum hjá felagnum generelt. Torkil Strøm helt, at nevndin skuldi royna at fáa

meira omaná lønina og ikki tvassa so nógv um pensjón. Eitt sjónarmið var eisini frammi um, at eftirlønarinngjaldið kanska kundi aldursdifferensierast soleiðis, at minni var rindað inn til eftirløn upp til til dømis 45 ára aldur og meira aftaná.

Eisini var mælt til, at nevndin skuldi royna at fáa reiðararnar at rinda ein størri part av eftirlønini.

Formaðurin helt samanumtikið, at limirnir skuldu vera glaðir um, at Maskinmeistarafelagið í góðari tíð hevur fingið eftirlønina so høgt upp, sum hon er, tí nú er hon lógarkravd at vera komin upp á 15 prosent hjá øllum í seinasta lagið í 2029. Tað merkir, at tey, ið ikki longu hava høgt eftirlønarinngjald, í komandi árum verða noydd at koyra at kalla allan lønarvøksturin upp á eftirlønina, so onki verður til vanliga lønarhækking.



**Torkil Strøm** helt, at Maskinmeistarfelagið í sáttmálasamráðingunum frameftir eigur at leggja seg eftir at fáa meira omaná lønina og ikki tvassa so nógv um pensjón.


Rein góðska úr norður Atlantshavi

www.cig.fo



Norðhavnin 8 · Postboks 329 · FO-726 Ánirnar · Føroyar
Tel. +298 20 70 00 · Fax +298 20 70 10
T-postur: cig@cig.fo · www.cig.fo

tekstur og myndir: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** *-PRESS*

**ANNFINNUR GARÐALÍÐ**

**Føddur:**
8.11.1967

**Giftur við:**
Mariann Poulsen Garðalíð, ergoterapeuti

**Børn:**
Tveir synir, 25 og 18 ára gamlir
Tvær døtur, 9 og 2 ára gamlar

**Systkin:**
Fýra beiggjar og eina systur

**Starv:**
Formaður í Føroya Skipara & Navigatørfelag

**Útbúgving:**
Skipari

**Útbúgvin nær:**
2001



**Annfinnur Garðalíð** í formansstólinum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

# Annfinnur Garðalíð: Betri sáttmálar er málið

**Nýggi maðurin á brúnni hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur sum fremsta mál at útvega limunum alt betri sáttmálar. Men hann hugsar eisini um annað enn sáttmálar og skip, í frítíðini fæst hann við seyð.**

Hann er uppvaksin í Vestmanna í einum systkinaflokki upp á fimm, fýra dreingir og ein genta. Og tað var eisini her, í fjøruni í Vestmanna, at hann fekk fyrsta smakkin upp á skip og fiskiveiði.

- Vit smíðaðu flakar, og so inn á posthúsið at biðja um tundurkassar, sum tað var nóg mikið av tá í tíðini. So fóru vit á fiskavirkið eftir toskarhøvdum, og síðan at seta gággulínu. Jú, tað var spennandi fiskiveiða hjá okkum, og vit trivust ómetaliga væl niðri í fjøruni, sigur Annfinnur Garðalíð.

Onkuntíð nýttu teir gággurnar sum agn til skrubbulínir.

**Dámdi onki skúlan**

Vestmenningar eru kendir fyri sín hondbólt, men tað gjørdist ongantíð tað stóra hjá Annfinni Garðalíð. Hann royndi seg stutta tíð á piltaliðnum, men gavst skjótt.

Og skúlan dámdi honum als ikki. Ein dagin, hann var tá komin í 8. flokk, reisti hann seg frá borðinum, fór upp til pultin til skúlastjóran, sum hevði tíma við teimum júst tá, og gav honum allar skúlabøkurnar.

- Eg komi ongantíð aftur í skúla, segði hann, fór avstað, og vísti seg ongantíð aftur í skúlanum.

Tá hann kom heim, varð hann koyrdur inn á eitt kamar við teimum boðunum, at hann slapp ikki útaftur, fyrr enn hann fór í skúla. Men Annfinnur varð sitandi á kamarinum, og fór ikki aftur í skúla.

**SEV**

Sum 14 ára gamal byrjaði hann at arbeiða hjá SEV, og var hjá SEV til hann var næstan 27 ára gamal. Fyrsta dagin varð hann koyrdur upp í ein pela, og tað gjørdist eisini hansara serøki sum linjumaður hesi árini. Hann var kringur og óræddur, og tí riggaði hann væl til júst hetta arbeiðið.

- Vit bygdu háspenningslinjur millum bygdirnar, og tískil vóru vit rættiliga nógv í fjøllunum. Tað kundi vera millum Vestmanna og Kvívík, Vestmanna og Hvalvík og aðrastaðni. Vit vóru eisini nógv úti á útoyggj, til dømis úti í Hesti, Koltri, Fugloy, Mykinesi og aðrastaðni. SEV var eitt fantastiskt arbeiðspláss. Tú kanst ímynda tær góðar summardagar

“Vit smíðaðu flakar, og so inn á posthúsið at biðja um tundurkassar, sum tað var nóg mikið av tá í tíðini. So fóru vit á fiskavirkið eftir toskarhøvdum, og síðan at seta gággulínu. Jú, tað var spennandi fiskiveiða hjá okkum”

**Annfinnur Garðalíð**



**Annfinnur Garðalíð** stendur nú á brúnni hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Her stendur hann á skrivstovuni hjá felagnum.

í fjøllunum við góðum og stórum matpakkum, hetta frælsið at vera úti í natúruni, tað var gott, sigur Annfinnur Garðalíð.

Men teir noyddust eisini stundum at arbeiða í vánaligum veðri við kava og kavaroki. Til dømis noyddust teir í fjøllini kavaódnina í 1988.

**Til skips**

Annfinnur Garðalíð gavst hjá SEV eins brádliga og í 8. flokki á sinni. Skip sum Pelagos, ið fiskaðu gulllaks og svartkjaft, vóru tá komin til landið. Annfinnur fór inn á gólvið hjá Regini á Rógvu at vita, um nakar møguleiki var at sleppa við, og sama dag fekk hann skipsboð. Síðan hevur hann siglt.

- Eg havi millum annað verið við Pelagos, Tjaldhamar, Gullberg, Vestmenningi, og so havi eg verið við skipum hjá Thor í Hósvík, sigur hann.

**Vegamót**

Í 1998 kom Annfinnur Garðalíð til eitt veruligt vegamót í lívi sínum. Hann noyddist at gera upp á ymsum persónligum økjum, og tá valdi hann at fara upp á skiparaskúla.

- Men eg hevði ov lítla skúlagongd til at sleppa á skiparaskúlan. Tí fór eg á Maskinmeistaraskúlan at taka eitt fyrireikingarskeið, sum eisini kundi nýtast til skiparaskúlan. Tá slapp eg so inn á skiparaskúla, sigur hann.

**Frítíðarítrivið er seyður**

Alt eru ikki skip og fiskiskapur hjá Annfinni Garðalíð. Stóri áhugi og frítíðarítriv hansara er seyður. Hann hevur fest Jákupsstovufestið, sum hevur verið í familjuni í út við 300 ár.

- Í fjallinum eru 9 merkur, og tað er alt felags seyður. Har eigi eg eina mørk. Aðrastaðni hava vit kenning og felag, har havi eg hálva mørk. Eg fái einar 40 til 45 seyðir um árið at slakta.

- Nú havi eg nakrar hornaseyðir gangandi í fjósinum, og teir passar Karl, beiggi mín, so tað er fínar greyðir, sigur Annfinnur Garðalíð.

- Eg kann lova fyri, at tað var tungt kortini. Hvør einasta lærugrein var tung at koma ígjøgnum hjá mær. Men eg fekk so skiparaprógvið eitt lítið sindur seinkað, sigur Annfinnur Garðalíð.

Hann noyddist at taka eitt fak umaftur, og tá gekk.

Tá hann var liðugur við skiparaskúlan í 2001, fór hann við Vesturland, sum fiskaði havtasku. Teir royndu við gørnum.

- Eg kom umborð sum dekkari fyrst, síðan sum kokkur, og stýrimaður onkuntíð. Men so fekk eg fastan kjans sum stýrimaður, greiðir hann frá.

Í 2003 varð báturin seldur til Hósvíkar, og Annfinnur Garðalíð slapp at halda fram sum stýrimaður. Við tíðini fór Annfinnur at avloysa skiparan, sum tá var sjálvur stjórin í Thor, Hans Andrias Kelduberg. Endin var, at Annfinnur Garðalíð gjørdist fastur skipari á Vesturland.

Síðan hevur hann arbeitt hjá Thor. Hann hevur millum annað ført Phoenix, rækjutrolaran Sermilikk, og so var hann umboðsmaður/eftirlitsmaður umborð á velduga kinverska verksmiðuskipinum, Kai li. Einir 105 mans vóru við.

**Í nevndina**

Annfinnur Garðalíð varð fyrstu ferð valdur í nevndina í Føroya Skipara- og Navigatørfelag í 2009.

- Til aðalfundin í fjør varð eg spurdur, um eg vildi taka við starvinum sum formaður, tí fyrrverandi formaðurin ynskti ikki afturval, sigur hann.

Og eftir valið valdi ein samd nevnd Annfinn Garðalíð til nýggjan formann í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

- Eg brenni fyrst og fremst fyri at fáa betri sáttmálar. Tað at raka nøgdsemið hjá limunum. Tað gera vit fyri at fáa meira í hendan vælsignaða peningaposan hjá okkum. Og altíð at vera tøkur hjá limunum, at leggja oyra til teirra ynskir, tað ætli eg at gera alt fyri, sigur nýggi formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Annfinnur Garðalíð, sum við síðani av formansstarvinum fæst við seyð. Hann fæst eisini nógv við samkomuarbeiði av ymsum slag saman við konuni, Mariann Poulsen Garðalíð.

tekstur og myndir: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** *-PRESS*

“Í lógini um undantaksloyvi stendur, at loyvið bert verður givið í heilt serligum føri. Og í dag verður hetta tikið bókstaviliga.”




**Páll Hansen**, formaður í Maskinmeistarafelagnum, vil hava Vinnuháskúlan at útbúgva fleiri maskinistar, tí stórur tørvur eru á maskinmonnum í heimaflotanum.

# Stórur tørvur á maskinistum og motorpassarum

Trotið á maskinistum og motorpassarum hóttir av álvara heimaflotan. Samstundis sum fáir maskinistar verða útbúnir av Vinnuháskúlanum, er tað vorðið truplari at fáa undantaksloyvi sum motorpassari

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, er ónøgdur við, at so fáir maskinistar koma frá Vinnuháskúlanum. Hann heldur ov langt vera millum flokkarnar.

- Eg síggi tað soleiðis, at tá Maskinmeistaraskúlin var uppi við Krákugjógv, áðrenn samanleggingina, vórðu maskinistar tiknir upp á hvørjum ári. Men tá skúlarnir yvir eina nátt vórðu samanlagdir og fekk navnið Vinnuháskúlin, bleiv brádliga hálvtannað ár ímillum, at maskinistar vórðu tiknir inn. Orsøkin til hettar, søgdu Mentamálaráðið og skúlastjórin, vóru sparingar. Mentamálaráðið tosaði eisini um at hava tvey ár ímillum, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

**Hálvtannað ár**

Páll Hansen heldur, at fyrr enn tikið verður upp á hvørjum ári, verður trupulleikin við tørvandi maskinfólki ikki loystur.

- Í øðrum lagi átti Vinnuháskúlin at havt skundskeið fyri motorpassarum eina ferð árliga. Tað hevði eisini hjálpt nógv upp á støðuna, sigur hann.

Stjórin í Vinnuháskúlanum, Wilhelm Petersen, sigur, at skúlin altíð vil laga seg eftir tørvinum. Hann heldur, at ein orsøk til tørvin á maskinistum í heimaflotanum ivaleyst er tann, at føroyskir maskinistar fara uttanlands at arbeiða.

- Vit vita, at nógvir føroyskir maskinistar t.d. eru í norska fiskiskipaflotanum, sigur Wilhelm Petersen.

Men Páll Hansen er ósamdur. Hann vísir aftur, at orsøkin til tørvin á maskinistum er, at føroyskir maskinistar fara uttanlands at sigla.

- Orsøkin er snøgt sagt títtleikin á upptøku. Her má skúlin koma á beint aftur við einum flokki árliga. Sparingar kunnu ikki bert ganga útyvir

heldur fram á næstu síðu >

maskinistar. Ongin kann siga nakran ringan fyri, at tú fert har, sum inntøkan er best. Tað burdi givið føroysku reiðarum nakað at hugsa um, heldur Páll Hansen
Hann vísir á, at ímeðan ein maskinistaflokkur verður tikin inn, verða fýra skiparaflokkar tiknir inn, um tú telur Klaksvíkar Sjómansskúla við.

**Reiðarafelagið sær trupulleikan**
Stjórin í Føroya Reiðarafelag, Herálvur Joensen, kennir til trupulleikan. Hann var longu í 2013, umboðandi Reiðarafelagið, á fundi við Vinnumálaráðið.

- Á tí fundinum gjørdu vit vart við tørvin á útbúnum motormonnum til heimaflotan, sigur Herálvur Joensen.

Reiðarafelagið merkir tørvin millum annað við, at neyðugt er hjá nógvum reiðaravirkjum at biðja um undantaksloyvi, so menn við skili fyri maskinum, men sum ikki hava neyðugu útbúgvingina, fáa undantaksloyvi. Annars kunnu skipini ikki loysa.

- Eg eri samdur við formannin í Maskinmeistarafelagnum um, at neyðugt er við fleiri útbúnum maskinistum ella motorpassarum, sigur Herálvur Joensen.

**Vantandi kontinuitetur**
Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur lítið um grungevingarnar fyri, hví skiparar verða tiknir so tíðum upp: Kontinuitetur.

- Hvat so við maskinistunum, har er ongin kontinuitetur. Her hongur ikki saman. Í fjør tók Vinnuháskúlin, við vælsignilsi frá Mentamálaráðnum, ein skiparaflokk upp við bara sjey næmingum. Vit hava ríkiligt av skiparum frammanundan. Tá kundi skúlin í staðin havt tikið einar 15 maskinistar inn. Men tað valdi Mentamálaráðið og skúlin so ikki at gera, og søgan endurtók seg aftur í ár, sigur Páll Hansen.

Samstundis sum fáir maskinistar verða útbúnir, er tað vorðið truplari at fáa undantaksloyvi. Í lógini um undantaksloyvi stendur, at loyvið bert verður givið í heilt serligum føri. Og í dag verður hetta tikið bókstaviliga.


**Stjórin í Vinnuháskúlanum, Wilhelm Petersen**, sigur, at Vinnuháskúlin altíð vil laga seg eftir tørvinum. Men í ár verða neyvan fleiri maskinistar ella motorpassarar tiknir inn, tí tað er ongin fígging til tað í 2015.

Hans Jóhannus á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum, sigur, at reglurnar viðvíkjandi undantaksloyvi eru púra greiðar, og tær verða eisini fylgdar. Men fólk, sum onga útbúgving hava, fáa ikki longur undantaksloyvi.

- Vit hava givið undantaksloyvi í nøkrum førum, har maskinistar og maskinmeistarar eru slopnir umborð uttan at hava neyðugu siglingstíðina. Trupulleikin er bara tann, at so skjótt, teir hava fingið siglingstíð, so rýma teir til dømis til Noregs. Og so hava hesi skipini í heimaflotanum aftur trupulleikar, sigur Hans Jóhannus á Brúgv.

Hann vísir á, at tað onkuntíð hevur verið upp á tal at søkt eftir maskinmonnum uttanlands, til dømis úr Póllandi. Men slíkt tekur tíð, og skipini kunnu illa liggja og bíða eftir maskinmonnum. Tað kostar ov nógv at lata skipini liggja við bryggju. Hans Jóhannus á Brúgv vísir eisini á, at arbeitt hevur verið við at broytt dugnaskaparroyndina í motorpassing upp til vanliga motorpassing, tað er, at viðkomandi kunnu ansa motorum upp til 749 hk.

**Motorpassarar**
Bæði formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, og stjórin í Reiðarafelagnum, Herálvur Joensen, halda, at fleiri útbúnir motorpassarar eisini høvdu loyst nógv.

- Í dag hava vit eitt slag av motorpassara-dugnaskaparroynd í kvøldskúlanum. Men menn kunnu illa leggja seg heima at taka eina slíka roynd ein heilan vetur, tí útbúgvingin tekur 160 tímar á kvøldskúla, vit sum rópa okkum eina maritima tjóð. Tað hevði verið ógvuliga gott, um Vinnuháskúlin kundi havt eitt rættiligt motorpassaraskeið, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

Stjórin í Vinnuháskúlanum, Wilhelm Petersen, heldur fast um, at skúlin vil laga seg eftir tørvinum. Í inniverandi ári loyvir fíggjarætlanin ongum út um tað, sum longu er í gongd.

- Men eg eri sinnaður at hyggja upp á tingini, sigur stjórin í Vinnuháskúlanum. Og eg kann eisini leggja aftrat, at vit á Vinnuháskúlanum hava kapasitetin at standa fyri slíkari útbúgving.

Skal eyka flokkur takast inn í 2015 er neyðugt við eykajáttan. Og tá liggur málið í Mentamálaráðnum.

## “Skal eyka flokkur takast inn í 2015 er neyðugt við eykajáttan. Og tá liggur málið í Mentamálaráðnum.“

tekstur: **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** *-PRESS*




Verða fleiri maskinistar útbúnir, verður lættari at fáa maskinmenn til føroyska flotan. *Tilvildarlig mynd.*

**"Tað hevði verið ógvuliga gott, um Vinnuháskúlin kundi havt eitt rættiligt motorpassaraskeið."**

**Ikki donsk krøv**

Í ætlanini at gera broytingar í manningarlógini snýr ein partur seg um motorpassarar og dugnaskaparroynd í motorpassing. Her sigur Maskinmeistarafelagið millum annað:

"Ásannandi at motorpassaraútbúgvingin ikki verður boðin út longur, kann Maskinmeistarafelagið taka undir við, at ásetingarnar um vinnubræv sum "Motorpassarar" verða broyttar til "Dugnaskaparbræv í motorpassing" treytað av, at útbúgvingarkrøvini verða dagførd. Tikið verður eisini undir við, at teir, sum hava vinnubræv sum motorpassarar, kunnu fáa hetta býtt um við "Dugnaskaparbræv í motorpassing."

Hinvegin kann Maskinmeistarafelagið ikki taka undir við, at donsk "Duelighedsbevis i motorpasning" verða stillað ájavnt við tey føroysku.

Og tað undrar Maskinmeistarafelagið almikið, at einki verður sagt í viðmerkingunum um, at talan er um heilt stóran mun í útbúgvingarkrøvunum til donsku og føroysku vinnubrøvini.

"Sambært kunngerð nr. 99 frá 04.07.1994 er frálærutíðin 160 tímar til føroysku dugnaskaparútbúgvingina, meðan frálærutíðin í donsku útbúgvingini er ásett til 10 dagar og sostatt eitt munandi lægri tímatal. Haraftrat kann upplýsast, at arbeitt hevur verið við at økja frálærutíðina til føroysku útbúgvingina til 200 tímar, júst fyri at tryggja, at skip undir 750 kW eru forsvarliga mannað, tá ið kravið um motorpassaraútbúgving verður slept," sigur Maskinmeistarafelagið millum annað í viðmerkingunum til ætlaðu broytingarnar.

tekstur og mynd: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*

# Ein rødd á sjónum

**Jóhan Weihe er einsamallur sjómaður í nevndini í Maskinmeistarafelagnum, og hann sær tað sum sína skyldu at umboða alt tað siglandi fólki í felagnum. Men ein fullfíggjaður sáttmáli fyri maskinmenn á skipum í frálandavinnuni er fremsta málið. At seta FAS í betri ljós í Noregi er eisini eitt mál, hann fer at stríðast fyri.**



Jóhan Weihe væntar ikki, at tað verður nakar trupulleiki at laga fundarvirksemið í Maskinmeistarafelagnum til hansara sigling, tí hann er fýra vikur umborð og fýra vikur heima.

Jóhan Weihe, nývaldi nevndarlimurin í Maskinmeistarafelagnum fer neyvan at keða seg í nevndararbeiðnum, tí hann hevur nógv hugskot og nøkur krevjandi mál við sær í skjáttuni.

- Tað vóru maskinmenninir í mínum egna reiðaríi, Team Beredskap, sum stillaðu meg upp til nevndina og gjørdu sítt til, at eg varð valdur á aðalfundinum. Og sjálvandi havi eg eisini eina dagsskrá við mær haðani. Men eg eri einasti sjómaður í nevndini, so onkursvegna kenni eg tað sum mína skyldu at umboða alt tað siglandi fólkið í nevndini í Maskinmeistarafelagnum, sigur hann. Team Beredskap er norskt, eitt undirfelag hjá frálandareiðarínum Simon Møkster Shipping, og eigur fýra frálandaskip, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS. Bert føroyingar sigla við hesum skipunum. Hvørt skipið hevur tvær manningar, ið skiftast, so tilsamans eru einir hundrað føroyingar knýttir at skipunum. Av teimum eru 12-15 maskinmenn.

Sjálvur siglir Jóhan Weihe sum maskinstjóri við veitingar- og hjálparskipinum Stril Mariner.

**Áhugin skal kveikjast**

Tað var eftir ein fund, sum Maskinmeistarafelagið hevði boðið maskinmeistarum á farmaskipum og skipum í frálandavinnuni til seint í fjør, at meistararnir í Team Beredskap tóku seg saman um at stilla ein av teirra upp til nevndarvalið í felagnum.

- Tað vóru bara umboð fyri Team Beredskap, sum møttu á fundinum, men vit fingu eitt gott prát og blivu nógv spurdir um okkara ynskir og arbeiðsviðurskifti. Aftaná varð ein facebookbólkur gjørdur, har vit hildu áfram at kjakast um ymisk evni, og eg bleiv okkara talsmaður.

- Eg bleiv so spurdur, um eg vildi stilla upp, og sjálvt um nevndararbeiði kanska ikki er tað, sum eg tími best, so segði eg ókey. Nú fari eg so at arbeiða víðari við teimum evnunum, vit hava tosað um, so fáa vit at síggja, hvussu leikur fer, sigur Jóhan Weihe.

- Tað er eisini so, at maskinmeistararnir á sjónum leingi hava verið alt ov illa umboðaðir í nevndini í Maskinmeistarafelagnum. So leingi, at áhugin fyri felagnum var farin at fána, og tað er eisini ein sannroynd, at nógvir meistarar í øðrum frálandareiðaríum als ikki eru limir í felagnum. Tað skal vendast, tí sjálvsagt er tað har, vit hoyra heima, men tað eru bara vit sjálvir, sum kunnu gera nakað við tað, og við at hava eitt umboð í nevndini skuldi borið til at økt um áhugan, heldur hann.

**Ein veruligan sáttmála**

Afturat høvuðssáttmálanum, Maskinmeistarafelagið hevur við Reiðarafelagið fyri Farmaskip, er ein sersáttmáli fyri maskinmeistarar í frálandavinnuni eisini gjørdur. Men tann sáttmálin er sambært Jóhan Weihe ikki nøktandi.

- Vit vilja hava ein veruligan sáttmála, ein sáttmála, sum er fyri frálandaskipini burturav. Sersáttmálin, sum nú er, er sjálvandi ein byrjan, men samanborið við ein høvuðssáttmála er hann enn bara eitt blankt pappír. So har skal eitt arbeiði gerast og nøkur tøk takast, tí í sáttmálahøpi vilja vit vera javnsettir við norskar maskinmeistarar, sigur hann.

Umframt, at føroysku meistararnir sjálvsagt ynskja sáttmálatrygd á sama støði sum teirra norsku starvsbrøður í norska partinum av Møkster-reiðarínum, so liggur eisini eitt diplomatiskt og pedagogiskt motiv aftanfyri hetta sáttmálaynskið.

**Hentleikaflagg**

Í Noregi verður føroyska flaggið á FAS-skrásettu skipunum nevniliga í stóran mun uppfatað sum eitt hentleikaflagg – av órøttum halda Jóhan Weihe og hinir føroyingarnir hjá Team Beredskap – og eitt av málum hansara í nevndararbeiðnum er at bøta um umdømið hjá FAS.

- Vit royna frammanundan, tað vit kunnu, at vaska føroyska flaggið reint í norskum eygum. Teir hava ringar royndir við eitt nú estiskt skrásettum skipum og uppfata føroyska flaggið á nøkulunda sama hátt. Men tað er tað reina tvætl, tí vit dumpa ongar lønir, og alt arbeiðið verður gjørt eftir norskum standardum, júst sum tað verður gjørt umborð á norskt skrásettu skipunum hjá Møkster.

- Tað er norska reiðaríið, sum ásetir allar mannagongdir, og FAS-skrásetingin merkir bara, at reiðaríið sjálvt hevur nakrar fyrimunir av tí skrásetingini, soleiðis at tað kann spara eitt sindur upp á raksturin. Alt hetta royna vit allatíðina at greiða norðmonnunum frá – at føroyska flaggið ikki er eitt discount-flagg eins og til dømis tað estiska – og at vit arbeiða eftir somu mannagongdum, sum norðmenninir sjálvir, men tað er ofta ein stór pedagogisk avbjóðing at fáa teir at skilja og trúgva, at tað veruliga er soleiðis, sigur Jóhan Weihe.

**Arbeiðið ongin forðing**

Hann legst ikki upp, tó at hann nú hevur fingið sæti í nevndini í Maskinmeistarafelagnum, men væntar, at tað fer at bera væl til at laga fundarvirksemið til, so tað ikki rennir saman við útmynstringunum.

- Eg eri fýra vikur umborð og fýra vikur heima, so tað eigur ikki at verða nakar stórur trupulleiki. Um tað tó onkra hendinga ferð verður neyðugt hjá einum tiltakslimi at traðka til, so verður tað, sum tað verður, sigur Jóhan Weihe.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, fær ikki eyga á nakra sakliga grundgeving fyri at linka føroysku førleikakrøvini til maskinmanning, og heldur endamálið vera eittans: - Lógarbroytingin skal bara vera ein legalisering av ávístum lógarbrotum og ein hjálpandi hond til teir reiðarar, ið ikki vilja halda galdandi lóg.



## Maskinmeistarafelagið:

# Myndugleikarnir lækka førleikastøðið

**Vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið renna ørindi fyri ávísar reiðarar, tá teir nú vilja linka førleikakrøvini til maskinmanning. Uppskotið hjá vinnumálaráðharranum um at broyta manningarlógina er eitt greitt afturstig, og øll tilgongdin til uppskotið er ódemokratisk, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.**

Tað tænir ikki Føroyum og føroyska umdøminum sum ein av fremstu siglandi tjóðum, at Johan Dahl, vinnumálaráðharri, nú vil lækka førleikakrøvini til maskinmanning á føroyskum fiskiskipum.

Tað er greiða fatanin hjá Maskinmeistarafelagnum, sum í hoyringsskrivi hevur ávarað ímóti ætlaðu broytingunum, eins og Páll Hansen, formaður felagsins, alment hevur funnist at teimum.

Ítøkiliga snýr tað seg um eitt uppskot um at broyta galdandi manningarlóg. Uppskotið varð lagt fyri Løgtingið 6. marts, og varð eftir fyrstu viðgerð beint í vinnunevndina, haðani tað ikki var komið aftur í tingið, tá blaðið fór til prentingar.

### Linkað krøv

Eftir uppskotinum skal ásetingin av motorstødd á einum skipi kunna broytast av Sjóvinnustýrinum, og tað er ein munandi linking samanborið við verandi lógartekst, sum greitt sigur, at tað er royndarflatutalvan hjá motorverksmiðjuni, sum ásetir motorstøddina – framtøkumegina.

- Tað er ongin saklig grundgeving fyri hesi broyting, sum bert hevur til endamáls at hjálpa reiðaríunum at spara uppá maskinmanningina við bara at áseta eina lægri framtøkumegi, har krøvini til maskinførleikar eru linari, enn tey eru, tá útgangsstøðið er veruliga framtøkumegin – tann sum verksmiðjan hevur felt niður á royndarflatutalvuna, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Vinnumálaráðið sigur í sínum almennu viðmerkingum til broytingaruppskotið, at broytingarnar javnseta føroysku krøvini til maskintænastu við vit tey í grannalondunum, og víst verður til altjóða sáttmálan um førleika/útbúgvingarkrøv til sjófólk, STCW (Standards of Training, Certification and Watchkeeping), sum Føroyar eru partur av. Í 2012 varð sáttmálin víðkaður til eisini at umfata fiskiskip, og sáttmálin við hesum serligu ásetingunum verður nevndur STCW-F.

Men Maskinmeistarafelagið tekur ikki undir við grundgevingunum hjá Vinnumálaráðnum og skrivar millum annað soleiðis í sínum hoyringsskrivi: "At Føroyar hava bundið seg til at fylgja altjóða reglum fyri útbúgving av manning til fiskiskip STCW-F, merkir eftir okkara tykki als ikki, at tað er skilagott at fara niður á tað minimum-støðið, sum har er lagt. Tvørtur ímóti so er tað okkara áskoðan, at orsøkin til, at vit í dag hava ein stóran hóp av maskinmanning, sum megnar at taka sær av tekniskt sera framkomnum skipum – bæði fiskiskipum og handilsskipum – og annars kann virka á hægsta støði kring allan heimin, er júst tann, at vit ikki hava lækkað okkara krøv til útbúgving og førleika niður til altjóða minstukrøv."

### Lægsti felagsnevnari

Maskinmeistarafelagið vísir eisini á, at ásetingarnar í føroysku manningarlógini eru samsvarandi teimum donsku og fylgdu við, tá málsøkið var yvirtikið, og har eru ongar ætlanir um at fremja broytingar, hevur danska Søfartsstyrelsen upplýst fyri Maskinmeistarafelagnum.

- Danmark verður vanliga roknað sum eitt grannaland, so tað er beinleiðis skeivt, tá Vinnumálaráðið grundgevur við, at ætlanin er at fáa krøvini á sama støði sum í grannalondunum. Veruliga ætlanin hjá Vinnumálaráðharranum og Sjóvinnustýrinum er at áseta lægsta felagsnevnara at galda í Føroyum, og tað eru norsku førleikakrøvini til maskinmenn. Norðmenn eru frammalaga á nógvum økjum, men júst tá tað

snýr seg um hetta, eru teir ikki nøkur góð fyrimynd, sigur Páll Hansen.

Eftir broytingaruppskotinum skal gamla motorpassaraútbúgvingin eisini javnsetast við dugnaskapsbrævið í motorpassing. Hetta góðtekur Maskinmeistarafelagið, tí motorpassaraútbúgvingin er ikki til longur, men felagið góðtekur ikki, at føroyska "Dugnaskapsbræv í motorpassing" verður líkastillað við tað danska "Duelighedsbrev i motorpassing", tí talan er um tvær ymiskar útbúgvingar á ymiskum støði. Frálærutíðin fyri at fáa føroyska dugnaskapsbrævið er 160 tímar, og arbeitt verður við at økja hetta talið til 200 tímar fyri at tryggja, at eisini skip undir 750 kW eru forsvarliga mannað. Frálærutíðin fyri at fáa danska dugnaskapsbrævið er 10 dagar – tað er skúladagar.

**Hjálp til reiðarar**

Maskinmeistarafelagið hevur havt fleiri mál um skip, har førleikakrøvini til maskinmanning ikki eru fylgd, og felagsformaðurin er sannførdur um, at broytingaruppskotið við nógv linkaðu førleikakrøvunum er bílagt arbeiði.

- Myndugleikarnir, Sjóvinnustýrið og Vørn, eru fullkomuliga passivir, tá próvføst lógarbrot verða framd og ávíst. Lógarbroytingin skal so bara vera ein legalisering av hesum lógarbrotum og ein hjálpandi hond til teir reiðarar, ið ikki vilja halda galdandi lóg, sigur Páll Hansen.

**Ódemokratisk mannagongd**

Í hoyringssvarinum til Vinnumálaráðið finst Maskinmeistarafelagið eisini hvassliga at allari mannagongdini, tá broytingaruppskotið er snikkað til, tí avvarandi partar ikki eru tiknir við upp á ráð í sjálvari tilgongdini, men bara eru slopnir at koma við einum hoyringssvari til eitt liðugt uppskot.

Páll Hansen stendur tí spyrjandi, tá Johan Dahl í aðrari grein her á síðunum sigur, at sambært Sjóvinnustýrinum hevur Maskinmeistarafelagið verið við í allari tilgongdini.

-Tað er ikki satt, tí Maskinmeistarafelagið hevur ikki verið við í tilgongdini til hattar lógaruppskotið. Vit vóru saman við Skipara- og Navigatørfelagnum og Reiðarafelagnum á einum fundi, har vit tosaðu um onkrar broytingar fyri skip niðanfyri 749 kW. Tað høvdu vit onki ímóti, men hatta við at kunna áseta eina aðra framtøkumegi, enn ásetingin frá fabrikkini vísir, er luskað inn í uppskotið aftaná, sigur hann.

Maskinmeistarafelagið heldur alla tilgongdina vera so ódemokratiska, at felagið mælir til, at uppskotið als ikki verður viðgjørt, ella við øðrum orðum, at vinnumálaráðharrin tekur tað aftur. Í síni niðurstøðu í endanum á hoyringssvarinum skrivar

"Um tað verður mett neyðugt at fremja broytingar í manningarlógini, má myndugleikin seta bólk við øllum viðkomandi pørtum at tilevna eitt slíkt uppskot, og Maskinmeistarafelagið fer avgjørt at hava ein aktivan leiklut í einum slíkum arbeiði",

Í galdandi manningarlóg er framtøkumegin á einum skipi definerað í § 2, pkt. 12:

"Øll tann samanlagda megin í kilowatt (kW), men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru, við støðuga gongd á øllum maskinum, sum samstundis kunnu dríva skipið fram. Orkan verður ásett grundað á royndarflatutalvuna hjá motorverksmiðjuni, og verður hon at seta í siglingarloyvisbrævið og manningarskjalið."

Eftir broytingaruppskotinum skal hesin setingur leggjast afturat: "Er framtøkumegin støðugt lækkað, kann henda skrivast í siglingarloyvisbrævið og í manningarksjalið eftir avgerð og ásettum treytum frá Sjóvinnustýrinum."

# Klakkur og Eivind

Línuskipini Eivind úr Sandavági og Klakkur úr Klaksvík eru dømi um brot á ásetingarnar um maskinmanning í galdandi manningarlóg, sum sambært Maskinmeistarafelagnum verða gjørd lóglig, um broytingaruppskotoð hjá Johan Dahl verður samtykt í Løgtinginum.

**Klakkur**

Línuskipið Klakkur úr Klaksvík mynstraði februar í fjør tveir persónar sum maskinmenn, hóast hvørgin hevði neyðugu vinnubrøvini – annar var harafturat eisini mynstraður sum stýrimaður.

Tann eini mynstraði maskinmaðurin hevði eitt danskt dugnaskapsprógv sum motorpassari, ið bert gevur rætt at passa motorar upp til 449 kW. Maskinorkan – framtøkumegin – hjá Klakki er 791 kW.

Hin mynstraði maskinmaðurin hevði als onki vinnubræv til maskintænastu. Sambært manningarskjalinum hjá Klakki skal skipið í minsta lagi vera mannað við einum maskinstjóra við sjóvinnubrævi sum skipsmaskinistur á 1. stigi og einum 1. meistara við sjóvinnubrævi sum skipsmaskinistur á 2. stigi.

**Eivind**

Línuskipið Eivind úr Sandavági loysti 31. mars, 24. apríl og 25. mai í fjør við bert einum maskinmanni á mynstringarlistanum, og á hesum er onki upplýst um vinnubræv hjá viðkomandi.

Sambært manningarskjalinum hjá Eivindi skal skipið í minsta lagi vera mannað við einum maskinstjóra við sjóvinnubrævi sum skipsmaskinistur á 1. stigi og einum 1. meistara við sjóvinnubrævi sum skipsmaskinistur á 2. stigi.

Skiparin hevur upplýst maskinorkuna at vera 749 kW, hóast framtøkuorkan á manningarskjalinum er skrásett at vera 1325 kW.

1325 kW er eisini tað, sum stendur á sonevndu royndarflatutalvuni hjá motorverksmiðjuni, og manningarlógin ger í so máta ongi undantøk fyri plomberaðar motorar.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*

- Sjóvinnustýrið er fakkunnleikin hjá landsstýrismanninum á økinum, og hevur landsstýrismaðurin valt at fylgja tilmælunum frá Sjóvinnustýrinum, sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri, um broytingaruppskotið, sum skal linka førleikakrøvini til maskinmanning.




# Johan Dahl verjir lógarbroyting

## Atlit verða í fyrsta lagi tikin til trygdina og í øðrum lagi til kappingarførið mótvegis grannalondunum, tá broytingar verða gjørdar í manningarlógini, sigur vinnumálaráðharrin.

Tað er Sjóvinnustýrið, sum hevur gjørt tilmælið til broytingarnar í manningarlógini, og Johan Dahl, vinnumálaráðharri, sigur, at hann hevur valt at fylgja tí tilmælinum og onga orsøk sær til at ivast í dygdini í tí ella sjálvari tilgongdini, sum Maskinmeistarafelagið heldur vera ódemokratiska.

- Sambært Sjóvinnustýrinum hevur Maskinmeistarafelagið verið við í allari tilgongdini at gera lógaruppskotið – bæði áðrenn lógaruppskotið fór til hoyringar og aftaná. Tilgongdin hevur ikki verið tann sama, sum tá manningarlógin varð gjørd í 1998, men er hetta ikki einstýðandi við, at talan hevur verið um eina ódemokratiska tilgongd, sum Maskinmeistarafelagið vil vera við.

- Tá ið eitt lógaruppskot verður sent út til ummælis fáa viðkomandi partar møguleika at gera viðmerkingar, og verða hesar viðmerkingar viðgjørdar, áðrenn málið verður latið Løgtinginum. Hetta er ein vanlig mannagongd, sum eisini hevur verið brúkt í tilgongdini í sambandi við hettar broytingaruppskotið, sigur Johan Dahl.

Hetta er tó greitt í andsøgn við tað, sum formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sigur í greinini "Myndugleikarnir lækka førleikastøðið". Har leggur hann dent á, at felagið IKKI hevur verið við í tilgongdini til broytingaruppskotið.

**Verjir norsk krøv**

"Vinnumálaráðharrin vísir aftur skuldsetingarnar um, at farið verður eftir lægsta felagsnevnara, tó at hann viðgongur, at hugt hevur verið eftir norsku manningarkrøvunum.

- Í sambandi við broytingina í uppskotinum, har Sjóvinnustýrið fær heimild at áseta støðugt niðursetta framtøkumegi á manningarskjalinum, er nevnt í viðmerkingunum, at henda mannagongd eisini verður nýtt í grannalondum okkara, millum annað í Noregi. Noreg telist millum mest framkomnu sjóvinnutjóðir í heiminum, og tí er ringt at skilja, hví Maskinmeistarafelagið sáar so stóran iva um norsku krøvini til maskinmanning. Ynskið við hesi broyting er, at krøvini í Føroyum verða eins og í grannalondunum, sigur vinnumálaráðharrin.

Í aðrari grein her á síðunum verður tó staðfest, at førleikakrøvini í donsku manningarlógini, sum tann føroyska er sprottin úr, ikki verða linkað.

**Trygd og kapping**

Johan Dahl vísir staðiliga aftur, at hann rennir ørindi fyri einstakar aktørar í vinnuni, men ger samstundis eisini greitt, at atlit eisini eru tikin til kappingarførið hjá allari tí føroysku fiskivinnuni.

- Tá ið skotið verður upp at gera broytingar, verður altíð fyrst og fremst tikið atlit til, at broytingarnar eru forsvarligar og hóskandi við atliti til trygd á sjónum, og verður tá eisini hugt eftir, hvørji viðurskifti eru galdandi á økinum í grannalondunum. Av tí, at sjóvinna er ein altjóða vinna, har kapping er um arbeiðsmegina, hevur tað eisini týdning, at føroysk viðurskifti og treytir ikki eru strangari enn í grannalondunum, sigur Johan Dahl.

**Siðvenja í grannalondum**

Sambært vinnumálaráðharranum er tað siðvenja í grannalondunum – eisini í Danmark – at tað ber til at seta eitt annað tal á manningarskjalið enn tað, sum stendur á royndarflatutalvuni.

- Sjóvinnustýrið hevur spurt seg fyri hjá avvarðandi myndugleikum í Danmark, Noregi og Íslandi. Sambært myndugleikunum í bæði Danmark og Noregi verður tað praktiserað, at støðugt lækkað framtøkumegi verður brúkt sum grundarlag fyri krøvunum til maskinmanningina.

- Felags er, at tað ikki stendur beinleiðis í lóggávuni, at tað ber til at áseta støðugt niðursetta framtøkumegi á manningarskjalið og siglingarloyvisbrævið. Tað er hinvegin vanlig siðvenja at loyva hesum við ávísum treytum. Víst verður á, at avgerð verður tikin grundað á eina meting í hvørjum einstøkum føri, og vanligt er samstundis at geva eitt treyta loyvi, umframt at reiðarin skal skjalprógva fleiri viðurskifti.

**Próvfast grundarlag**

Johan Dahl vísir eisini til viðmerkingarnar í sjálvum broytingaruppskotinum, har tað stendur, at tað bert skal verða loyvt at áseta og skriva lækkaða framtøkumegi í manningarskjalið, um próvfast grundarlag er fyri, at framtøkumegin er lækkað støðugt.

- Eftir at henda meting er gjørd, kann Sjóvinnustýrið samstundis seta nærri treytir, tengdar at avgerðini um at seta støðugt lækkaðu framtøkumegina í manningarskjalið. Dømi um hetta kann vera, at avgerðin er treytað av, at framtøkumegin ikki verður hækkað aftur. Verður henda treyt ikki fylgd, so er fyritreytin fyri manningarásetanini ikki til staðar, og harvið skal manningarskjalið takast aftur, sigur Johan Dahl.

Viðvíkjandi ákærunum frá Maskinmeistarafelagnum um passivitet í sambandi við staðfest lógarbrot sigur hann, at Sjóvinnustýrið hevur kunnað seg um, at stovnurin hevur verið í sambandi við Maskinmeistarafelagið um málini, og at tey eru til viðgerðar innanhýsis á stovninum.

# Fótonglar fyri innliti

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag heldur, at lógin um alment innlit verður tulkað ov stramt av almennu myndugleikunum og altíð til fyrimuns fyri reiðararnar.



Støðan er als ikki haldbar, heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, tí lógin um alment innlit verður so stramt tulkað, at ávís reiðaríir beinleiðis gera sær dælt av hesum. *Mynd: Ingolf S. Olsen*

**Ingolf S. Olsen** - *PRESS*

Tað er ikki bara sum at siga tað hjá manningarfeløgunum at halda eyga við, um limir teirra verða avroknaðir í samsvar við sáttmálan, og at tølini á avrokningunum eru í samsvar við veruligu avreiðingartølini.

Feløgini hava nevniliga ongan møguleika fyri at eftirkannað hetta seinasta, tí avreiðingarprísurin ofta verður duldur.

Støðan er als ikki haldbar, heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, tí lógin um alment innlit verður so stramt tulkað, at ávís reiðaríir beinleiðis gera sær dælt av hesum.

- Tað er sera torført hjá manningafeløgunum at fáa allment innlit í eitt nú avreiðingarseðlar og vektarseðlar við ymisku prísunum av ymisku fiskasløgunum, eitt nú á uppsjóvarfiski, frá einstøkum reiðaríðum. Men við tógvið stríð hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag eins og hini manningafeløgini av sínum eintingum og uttanum almennu eftirlitsmyndugleikarnar millum annað kunnað staðfest fjaldar frádráttir, sum ikki eru loyvdir sambært sáttmálanum.

- Hetta er óreglusemi, sum eigur at kunna avdúkast í stundini, um til dømis Vørn og Trygdargrunnurin høvdu latið okkum allar upplýsingar um avreiðingar og serliga um avreiðingarprísin. Men hann fáa vit ikki at vita, sigur Annfinnur Garðalíð.

**Óreglusemi**

Í einum føri hevur Føroya Skipara- og Navigatørfelag, eftir at hava fingið noktandi svar frá Vørn uppá umbøn um alment innlit, við egnum kanningum avdúkað óreglusemi í sambandi við kvotakeyp millum skip svarandi til 35 prosent av søluvirðinum.

Í sínum svari vísir Vørn til eitt líknandi mál, har sýtingin fyri almennum innliti í søluprísin var kærd til Løgtingsins umboðsmann. Millum annað stendur soleiðis í svarinum:

"Vørn vísir á, at upplýsingar viðvíkjandi nøgd, slag og dagfesting kunnu útflýggjast sbrt. § 4, stk. 1 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. Juni 1993 við seinni broytingum um innlit í fyrisitingina, men sbrt. §10 stk. 1 nr. 5 í somu lóg fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum ella vísindaligum kanningum. Sostatt fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um upplýsingar um prís á veiðini."

# Samráðast enn

**Ingolf S. Olsen** - *PRESS*

Meðan tað gekk skjótt og gott at fáa avgreitt sáttmálarnar fyri farmaskipini – øll trý manningarfeløgini høvdu skrivað undir nýggjan sáttmála við Reiðarafelagið fyri Farmaskip tíðliga í árinum – so hevur gingið heldur seinni at fáa alt upp á pláss við fiskiskipunum.

Har var ongin sáttmáli undirskrivaður, tá blaðið fór til prentingar.
Sáttmálin við Føroya Reiðarafelag gekk út á nýggjárinum, men bæði Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag gingu við til at leingja hann fram til 1. mars.



Reiðarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag á fundi í Vinnuhúsinum. *Mynd: Øssur Winthereig*

Maskinmeistarafelagið hevur havt fleiri samráðingarumfør, men ikki fyrr enn tíðliga í hesum mánaðinum var hol veruliga sett á samráðingarnar millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.

Av virðing fyri mótpartinum vil hvørki av feløgunum enn siga nakað serligt um gongdina í samráðingunum, og hvørjir ivaspurningar eru.

tekstur: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS* • myndir: **ERLAND H. RASMUSSEN,** Vinnuháskúlin

# Fríggjadagin 23. januar vórðu 39 prógv handað

Fríggjadagin, 23. jan. 2015, fingu 39 lesandi prógv handað á Vinnuháskúlanum – 17 maskinmeistarar, 11 skipsførarar og 11 skiparar.

Eini 250 fólk vóru komin saman fyri at luttaka í próvhandanini á skúlanum. Eftir vælkomst og røðu frá Wilhelmi E. Petersen, stjóra, helt gestarøðarin Gunnbjørn Joensen, stjóri hjá Thor í Hósvík, eina røðu. Formenninir í Maskinmeistarafelagnum og í Føroya Skipara- og Navigatørfelag hildu hvør sína stutta røðu, og umboð fyri næmingarnar søgdu eisini nøkur orð. Umframt virðislønirnar, sum eru nevndar undir myndunum, var ein virðisløn latin frá Skipara- og Navigatørfelagnum til tann av navigatørunum – skipsførar og skiparar – sum fekk hægsta miðalpróvtalið. Virðislønin var ein Sekstantur, sum Torfinn Debes Davidsen, skipari, fekk.



**Maskinmeistarar:**
Tummas Eli Bjartalíð
Jóhan Falkvard Klementsen
Sjúrður Rein
Jóhan Elias Johannesen
Símun Olsen
Johan Dam
Rógvi Mortensen
Heini Kallsoy Mouritsen
Páll Róland Petersen
Eskild Hjalti Freilif Bech
Ludvík Christiansen
Emil Dam
Knút Olsen
Bjarki Johannes Niclasen
Justi Hentze
Benjamin Hansen
Jóhannes Sørensen

**Virðislønir:**
1. Justi Hentze, fartelefon frá Suðuroya Sparikassa
2. Sjúrður Rein, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum
3. Benjamin Hansen, lummaur frá Áhugafelagnum Antares

**Ídnisvirðisløn:**
Benjamin Hansen, gullur frá A. P. Møller





**Skiparar:**
Rúni Vestergaard Thomsen
Dániel Leo Gaardlykke
Ragnar í Soylu
Ásmundur Poulsen
Torfinn Debes Davidsen
Høgni Eyðunsson á Lofti
Eyðstein Joensen
Ragnar Hansen
Arngrím Sigurd Thomsen
Eyðun Jespersen og
Bjarki Fríðheim

**Virðislønir:**
1. Torfin Debes Davidsen, kikara frá P/F Thor
2. Ragnar í Soylu, barometur og klokkusett frá Faroe Agency
3. Rúni Vestergaard Thomsen, barometur og klokka frá Faroe Ship

**Ídnisvirðisløn:**
Torfin Debes Davidsen,
lummaur frá Áhugafelagagnum Antares.

**26. mars** fingu Birgir Holm og Rói Magnussarson eisini handað prógv sum skiparar.

**Skiparar:**
Birgir Holm
Rói Magnussarson

*(Privat mynd)*



**Skipsførarar:**
Hildibrandur Olsen
Andreas Pauli Davidsen
Hans Jørgin Kruse Ellingsgaard
Martin Klein Kragesteen
Óli Hansen
Óla Christian Debes
Eyðun Brimstrond Leo
Steintór Kjartan Fríði Djurhuus
Rúni í Homrum
Fríði Gullbein
Tróndur Rosendal Gregersen

**Virðislønir:**
1. Óli Hansen, gull ur frá A. P. Møller
2. Hans Jørgen Kruse Ellingsgaard, klokkusett frá Tryggingar felagnum Føroyar
3. Hildibrandur Olsen, lummaur frá Antares

**Ídnisvirðisløn:**
Óli Hansen, ur, knív og pennasett frá Søfartens Ledere

tekstur: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS* • mynd: **ERLAND H. RASMUSSEN,** Vinnuháskúlin



# Fríggjadagin 13. mars fingu 19 maskinistar prógv

Fríggjadagin 13. mars fingu 18 menn og ein kvinna prógv handað á Vinnuháskúlanum.

Eini 100 fólk vóru til samkomuna, har Wilhelm Petersen, stjóri, beyð vælkomin og helt eina røðu.

Í mars vóru 50 ár liðin, síðani maskinistútbúgvingin byrjaði í Føroyum, og fekk hetta nógv rúm í røðuni hjá stjóranum. Hann nevndi millum annað, at útbúgvingin ta fyrstu tíðina gav rættindi at passa maskinur upp til 500 hk svarandi til 368 KW, men síðani er ment, so níggju mánaðar langa maskinistútbúgvingin í dag gevur rættindi at passa maskinur upp til 2999 KW og samstundis eisini atgongd til altjóða maritimu vinnuna.

Vinnuháskúlin hevur seinastu árini bert tikið maskinistar inn á skúlan triðja hvør hálvár. Men um nóg stórur áhugi er, verður ein flokkur longu tikin inn aftur at byrja í august í ár.

Umframt stjóran á Vinnuháskulanum søgdu Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Kristin Rasmussen, lærari, nøkur góð orð á samkomuni.

**Maskinistar:**
Rógvi Aagaard Nielsen
Bjarni Berg, Heini Guttesen
Sigurd av Reyni
Kristoffur Gaardlykke
Levi Anthoniussen
Jóan Petur Elmarson Petersen
Uni Oknadal
Heri Múller Jacobsen
Rúni Joensen
Bárður Olsen
Andy Ljósá
Eivind Egholm Gudmundsen
Rani Christophersen
Jóhannus Hansen
John Reid Ziska Jacobsen
Remi Hammer
Sólgerð Joensen
Remi Johansen

**Virðislønir:**
1. Bjarni Berg, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum
2. Rógvi Aagaard Nielsen, kikara frá Eik Banka.
3. Jóan Petur Elmarson Petersen, lummaur frá Antares.

ROLLS ROYCE

MEST
– álítandi loysnir

# ROLLS ROYCE KRANAR

- LONGRI LIVITÍÐ
- LÆGRI VIÐLÍKAHALDSKOSTNAÐUR
- LYFTIORKA ÚR 2 T OG UPPEFTIR

**Ring og hoyr nærri um Rolls Royce kranar á tlf 301100**




MEST P/F
J.C. Svabosgøta 31
P.O.BOX 65
FO-110 Tórshavn

tel:+298 301100
fax:+298 301101
info@mest.fo
www.mest.fo

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** -*PRESS*



- Vit fara at royna at gera tiltøk, har øll familjan kann vera við, sigur Andreas Poulsen, sum er nýggjur formaður í felagnum Antares.

## Andreas Poulsen, nýggjur formaður í Antares:

# Vit skulu kunna um alt

Felagið Antares hevur á aðalfundi valt nýggja nevnd, sum hevur skipað seg við Andreasi Poulsen, sum formanni.

- Høvuðsendamálið hjá Antares er at kunna okkara limir. Ikki bara um skatting, men um øll møgulig viðurskifti, sigur nýggi formaðurin í Antares.

Í dag er Antares eitt felag, sum skal hýsa øllum føroyingum, sum arbeiða uttanlands – bæði á sjógvi og landi. Andreas Poulsen leggur dent á, at Antares ikki er eitt fakfelag, men eitt felag, sum skal samansjóva allar limirnar, sum starvast uttanlands og sum eisini hevur eitt sosialt endamál.

- Vit arbeiða fyri áhugamálum hjá okkara limum, og vit arbeiða bæði saman við føroyskum og útlendskum fakfeløgum, sigur Andreas Poulsen. Hann heldur, at flestu av teimum, sum sigla úti eru limir í feløgum í tí landinum, har teir sigla.

Felagið hevur í dag góðar 600 limir, men hildið verður at einir 2500 føroyingar arbeiða uttanlands, so enn er pláss fyri nógvum limum afturat. Av núverandi limaskaranum eru teir flestu fólk, sum arbeiða á sjónum uttanlands, men síðani felagið skoytti setningin "vit sum starvast uttanlands" upp í búmerkið, eru eisini fleiri limir komnir, sum arbeiða á landi.

Andreas Poulsen vísir á, at limaskarin er sera fjølbroyttur. Teir arbeiða hjá ymsum reiðaríum og í sera ymiskum yrkisgreinum. Hetta ger sjálvandi, at áhugamálini eru ymisk.

- Tað er ein styrki hjá felagnum, at vit eru so ymisk. Veit ein okkurt um onkur serlig viðurskifti, so kann hann siga øðrum frá, sigur Andreas Poulsen.

**Ráð og vegleiðing**

Umframt at kunna um viðurskifti, sum hava við okkara limir at gera, so er eitt av endamálunum eisini at veita limunum ráð og vegleiðing um eitt nú skattaviðurskifti og pensjónsviðurskifti. Felagið hevur seinastu árini arbeitt nógv við skattamálum, men fráfarni formaðurin Dánjal Jákup Meinertsson lat í síni seinastu formansfrágreiðing væl at:

- Meðan friður stórt sæð hevur verið um skattin, snúði 2014 seg mest um eftirlønir. Vit eru komin á mál við nógvum, men enn er okkurt eftir. Onkur gomul skattamál spøkja eisini, og vit bíða eftir eini løgfrøðiligari meting til tess at kunna gera av, í hvønn mun vit kunnu stuðla einum rættarmáli, segði Dánjal Jákup Meinertsson. Hann tók ikki við afturvali.

- Ofta kenna politikarar ikki bakgrundina hjá okkum, sum starvast uttanlands, men í fleiri førum hava vit



**ANDREAS POULSEN**

Andreas Poulsen siglir sum yvirstýrismaður við norskum frálandaskipið í reiðaríðnum DOF. Teir sigla mest í Norðsjónum út frá Aberdeen.

Andreas Poulsen hevur verið limur í Antares í fleiri umførum síðani felagið var stovnað í 2004. Hann er útbúgvin skipsførari á Vinnuháskúlanum í 2001.

Frá 1997 til 2011 hevur hann siglt við Mærsk, har hann hevur roynt øll øki - eitt nú konteynaraskip, supplyskip og tangabátar. Andreas Poulsen er giftur við Jonnu Poulsen. Tey hava tvær gentur, Hildigunn 9 ár og Mariu 5 ár.

verið við til at greitt teimum frá støðuni, so mótstøða er broytt til undirtøku, sigur Andreas Poulsen, sum vísir til broytingar í skattalógini í 2012.

**Pensjónsviðurskifti**

Næstu tíðina eru tað pensjónsviðurskiftini, sum felagið eisini ætlar at arbeiða við. Nú tá kravt verður í Føroyum, at øll skulu gjalda eitt ávíst prosenttal í pensjón, so kemur tað illa við eitt nú hjá teimum, sum eisini skulu gjalda til Folketrygd í Noregi.

- Flestu politisku flokkar eru sinnaðir at tillaga pensjónsskipanina og hava víst vælvilja, sigur Andreas Poulsen. Hann heldur á, at føroyskir sjómenn í Noregi áttu at sloppið undan at goldið føroyska pensjón, tí teir gjalda til Folketrygd.

- Fleiri hava sent umsókn um frítøku fyri føroyska eftirlønargjaldið, men vit vita ikki, hvussu tað spælir av. Vit arbeiða við at fáa ein norskan serfrøðing til Føroya at greina viðurskiftini fyri okkum, so hóskandi tillagingar kunnu gerast í lógarverkinum. Politiska skipanin tykist vera vælviljað hesum viðvíkjandi. Vónandi eru vit komin á mál við hesum, áðrenn 2015 skal gerast upp, og best hevði verið at fingið tað frá hondini fyri komandi løgtingsval, segði Dánjal Jákup Meinertsson á aðalfundinum hjá felagnum.

**Familjan skal við**

Á sosiala økinum er flaggskipið á landi fríggjadagskaffi, har felagið hvønn fríggjadag skipar fyri felags kaffimunni á fleiri støðum kring landið.

- Vit eru á so ymiskum arbeiðsplássum, at tað er ringt at skipa fyri nøkrum felags upplivingum. Á arbeiðsplássum á landi hava tey nógv felags tiltøk – jólaborð, summartúrar og familjutúrar, men tað ber ikki rættuliga til hjá okkum, sigur Andreas Poulsen.

Tí leggur felagið seg nógv eftir at royna at savna limirnar til ymisk tiltøk. Felagið verður aftur í ár við á FishFair framsýningini við egnum bási, og fólk frá felagnum vera til staðar. Framsýningin í ár verður í Klaksvík. Felagið er eisini fastur gestur á Sjómannadegnum.

Higartil hava tiltøkini mest vent sær til limirnar, men nýggi formaðurin vónar tiltøkini kunnu víðkast.

- Vit fara at royna at gera tiltøk, har øll familjan kann vera við. Tað fer at koma, sigur Andreas Poulsen.

Fyrsta brotið í endamálinum hjá felagnum sigur, at felagið skal virka fyri at nøra um samstarv og samanhald í millum limirnar, og ímillum familjur teirra.

Limatalið hevur seinastu árini verið støðugt vaksandi og felagið svarar hvørja viku fleiri fyrispurningum bæði frá limum og øðrum.

Heimasíðan www.antares.fo er eisini ein virkin síða, sum hevur umleið 70 vitjandi um vikuna. Á heimasíðuni verða tíðindi dagførd hvønn dag.

Endamálið við tíðindunum er eisini at hava tíðindi úr teimum londum og plássum, har limirnir arbeiða og ikki bara úr Føroyum.



**Dánjal Jákup Meinertsson** fór frá sum formaður í Antares.

tekstur: **ØSSUR WINTHEREIG** -*PRESS* mynd: Jan Müller




**Magni Laksáfoss** hevur framløgu á aðalfundinum hjá Antares

## Kanningin um arbeiðsmegi uttanlands:

# Ein fongur fyri samfelagið

Kanningin um føroyska arbeiðsmegi uttanlands vísir, at samanumtikið hava vit, sum starvast uttanlands, stóran týdning fyri Føroyar, sigur Andreas Poulsen, nývaldi formaðurin í Antares. Tað vóru Antares og Skipara- og Navigatørfelagið, sum bóðu um kanningina.

Kanningin um føroyska arbeiðsmegi uttanlands skuldi lýsa, hvønn týdning tey, sum starvast uttanlands hava fyri samfelagið, og kanningina skuldi eisini royna at vísa, hvussu nógv sigla og starvast uttanlands.

- Eg gjørdist kløkkur, tá eg sá hvussu stór tølini vóru um búskaparliga íkastið til samfelagið, sum vit sum starvast uttanlands hava, sigur Andreas Poulsen, formaður í Antares. Lønarinntøkurnar eru omanfyri eina milliard krónur.

Antares og Skipara- og Navigatørfelagið høvdu biðið Magna Laksáfoss, búskaparfrøðing, um at gera eina kanning, sum skuldi lýsa teir ymsu bólkarnar, sum arbeiða uttanlands og hvørjar fortreytir teir hava at arbeiða undir.

**Politikarar skulu lesa**

Kanningin, sum heild er eitt aftursvar til tær røddir, sum stundum hava ført fram, at føroyingar í arbeiði uttanlands sleppa ov lætt, tí teir arbeiða undir lagaligari skattaviðurskiftum enn føroyingar í Føroyum.

- Tað verður mangan í kjakinum av órøttum ført fram, at føroyska arbeiðsmegin uttanlands er ein útreiðsla fyri føroyska samfelagið, við tað at hon ikki letur skatt í Føroyum. Hagtølini og útrokningarnar vísa, at hetta er als ikki í samsvar við veruleikan, skrivar Magni Laksáfoss í samandráttinum í kanningini "Ein fongur fyri samfelagið".

Andreas Poulsen fegnast um, at nú er ein kanning gjørd, sum kann vera grundarlag undir orðaskiftinum. Og hann vónar, at eisini politikarar lesa frágreiðingina.

- Vit møta útsagnum frá vanligum fólki, sum byggja á, at tey ikki vita betur. Tað er keðiligt at hoyra, men nú kunnu vit vísa til hesa frágreiðingina, sigur Andreas Poulsen.

- Frágreiðingin er eitt amboð hjá okkum, sum starvast uttanlands, til at vísa til, um faktuellar villur koma fyri, sigur hann.

### Eisini til miðlarnar

Andreas Poulsen sigur við einum skálkasmíli, at eisini fjølmiðlarnir nú kunnu lesa hesa frágreiðingina áðrenn teir skriva, men skoytir hann uppí:

- Men tað ivist eg í, um teir fara at gera, og tað er ikki bara í Føroyum. Seinastu 10 árini eru alt fleiri føroyingar, sum hava valt at arbeiða uttanlands. Í tíðarskeiðnum 1997 til 2005 vóru tað umleið 1500 fólk og í 2012 vóru tað 2500 føroyingar, sum arbeiddu uttanlands. Lønarinntøkurnar hjá teimum eru farnar væl upp um eina milliard krónur.

Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, hevur roknað seg fram til, hvussu lønirnar hjá teimum býta seg í føroyska samfelagnum.

Víst verður á, at samansetingin av føroyingum, ið arbeiða uttanlands er broytt nógv. Tey fyrstu árini frá 1997 til 2001 arbeiddu nógv á landi, men seinni árini arbeiða nógv tey flestu á sjónum. Serliga eru tað tey, sum sigla undir FAS-skipanini, sum er vaksin nógv.

Andreas Poulsen leggur eisini dent á, at í løtuni hevði ikki verið pláss í Føroyum fyri øllum teimum, sum arbeiða uttanlands.

- Men nógv av reiðaríunum í Føroyum hava í dag fólk í starvi, sum hava nomið sær vitan við útlendskum skipum. Á tann hátt kemur vitanin eisini aftur til Føroya, sigur Andreas Poulsen.

### Keypa meiri enn onnur

Kanningin øll skal vísa, at tað sum liggur eftir í Føroyum eftir teimum, sum arbeiða uttanlands er minst líka nógv, sum hjá teimum, sum arbeiða í Føroyum. Her verður fyrst og fremst víst á, at væl kann vera, at hesir bólkar ikki gjalda skatt í Føroyum, men at íkastið til samfelagið – eitt nú til almennu inntøkurnar – er fult á stigi við, hvat onnur lata.

Hendan niðurstøðan byggir á, at lønirnar hjá teimum, sum arbeiða uttanlands eru so mikið høgar, at hesin bólkurin brúkar nógv meiri pengar í Føroyum enn onnur, og tað hevur við sær stórar inntøkur til tað almenna umvegis mvg og skrásetingargjøld. Harafturat rinda tey, sum arbeiða uttanlands, gjøld til ALS og onnur arbeiðsmarknaðargjøld.

Andreas Poulsen viðgongur, at serliga talvan um almennar inntøkur av fólki í ymsum vinnum kann tulkast á nógvar mátar, men samanumtikið er greitt, at tey sum starvast uttanlands hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið.

# Almennar inntøkur av fólki í ymsum vinnum




*Kelda: Hagstova Føroya, TAKS og útrokningar hjá Magna Laksáfoss.*

Hendan talvan í frágreiðingini hjá Magna Laksáfoss, var tann, sum flestu heftu seg við, tá kanningin var løgd fram á Hotel Føroyum fyrst í februar í ár. Her er stabbar settir upp fyri, hvussu nógv tríggir bólkar brúka til beinleiðis skatt, beinleiðis avgjøld, avleiddan skatt og avleidd avgjøld. Avleiddur skattur og avleidd avgjøld er td. skrásetingargjøld og mvg, tvs. beinleiðis knýtt at persónligu nýtsluni.

Teir tríggir bólkarnir eru arbeiðsmegi uttanlands, fólk í alivinnuni og fólk í fiskavøruídnaðinum.

Magni Laksáfoss skrivar í frágreiðingini, at tað er ikki stórur munur á inntøkunum, sum tað almenna fær frá hesum trimum bólkunum.

Stórur munur er tó á samansetingini á inntøkunum. Meðan størsti parturin av inntøkuni av arbeiðsmegini uttanlands er frá avgjøldum og avleiddum inntøkum, er størri parturin av inntøkunum frá løntakarum í alivinnuni og fiskavøruídnaðinum beinleiðis skattur.

Magni Laksáfoss sigur, at ikki ber til við vissu at siga, hvussu nógv tey, sum arbeiða uttanlands brúka í Føroyum og tí er talan eisini um egnar útrokningar, men eftir hansara tykki er óvissan sera lítil.

- Tey, sum arbeiða uttanlands hava stóra tøka inntøku, og tørvurin á ymsum nýggjum er alla tíðina, sigur Magni Laksáfoss.

tekstur : SNÆBJØRN Í DALI mynd: NAVIGATØRFELAGIÐ

# Regini Nónstein til minnis

## 22. 3. 1943 - 2. 1. 2015



Regin Nónstein var nevndarlimur og næstformaður i Føroya Skipara- og Navnigatørfelag í mong ár

**Tað vóru sorgarboð hjá okkum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, tá okkum var kunnugt at Regin Nónstein andaðist á Ríkissjúkrahúsininum 2. januar í ár - 71 ára gamal.**

Regin varð borðin í heim í Hvalba 22. mars 1943.

Stóran part av lívi sínum, var hann nevndarlimur og næstformaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Fyri felagið og okkum, sum unt var at samstarva við Regin hevur hann havt ómetaliga stóran týdning. Hann hevði innlit og evni sum valla nakar annar, tá tað snýr seg um tær mongu avbjóðingar, sum settar eru einum felag, ið hevur til endamáls at vinna limum sínum so góðar umstøður sum møguligt er. Við sínum nærlagni, lætta lyndi og frálíka góðu evnum var hann førur fyri - í góðum felagsskapi - at lyfta felagið fram á leið.

Hann hevði eisini tey evni, at hann megnaði at loysa fastlæstar støður, sum mangan koma fyri, tá sáttmálasamráðingar eru. Og tað er undir sáttmálasamráðingum, at tað skal prógvast, at felagið er ført fyri at røkja sína skyldu.

Regin vaks upp í einum heimi, sum hevði sítt støði í føroyskari fiskivinnu. Pápin, Niels Pauli Nónstein, var trolaraskipari og ein av stigtakarunum, tá hvalbingar keyptu trolaran Drátt í 1946. Mamman, Natalia, var eisini fødd og uppvaksin í Hvalba. Í 1946 tóku tey navnabroyting frá Ziskasen til Nónstein.

Regin fór í barnaskúla í Hvalba sjey ára gamal í 1950. Hugurin og evnini at nema sær kunnleika vóru góð, og 12 ára gamal sigur hann foreldrunum, at hann hevði hug at taka millumskúlaprógv, hóast tað ikki var møguligt í Hvalba. Tí flytur hann í 1955 norður til Klaksvíkar at ganga í millumskúla, sum í dag er partur av fólkaskúlanum. Tá ein 12 ára gamal smádrongur velur at flyta úr trygga barnaumhvørvi sínum til annan part av landinum, kunnu vit ikki siga annað enn, at hann hevur áræði, og áræði hevði Regin. Her eiga vit at hugsa um, at fimtiárini vóru merkt av álvarsomum rembingum í Føroyum. Hetta kom Regin eisini at uppliva í Klaksvík.

Men tað skapti honum kortini ongar trupulleikar, hann tók millumskúlaprógv í Klaksvík í 1959.

Hóast fimtiárini vóru trupul, so var kortini stór menning í sjó- og fiskivinnuni í Klaksvík hesi árini. Hetta ávirkaði Regin so mikið nógv, at hann á ungum árum fekk stóran áhuga og tokka til fiskivinnu og sigling, og longu tá setti hann sær fyri, at tað var á hesum øki, at hann skuldi útbúgva seg.

Hetta var so mikið greitt, at hann takkaði nei, tá honum í 1959 stóð í boði eitt trygt læruppláss á skrivstovuni hjá Skála Skipasmiðju. Sum viðurskiftini vóru tá, høvdu helst tey flestu við gleði tikið í móti slíkum tilboði. Men Regin hevði eina aðra ætlan.

Í fyrstu atløgu valdi hann at flyta aftur til Hvalbiar. Ivalesyt hevði hetta samband við, at pápin júst tá hevði fingið skiparatjans við Jóannesi Patussyni. Tá hevði pápin verið uppilagstur í nøkur ár, og hevði virkað sum handilsmaður í Hvalba.

Tá pápin var farin aftur til sjós mátti onkur annar koma í hansara stað í handlinum. Ta uppgávuna átók Regin sær. Hetta má hava verið ein tung byrða hjá einum unglingi at lyfta.

Men seiggið hevur verið gott, tí umframt arbeiðið í handlinum, megnaði hann eitt tíðarskeið eisini at royna seg í kolinum. Eins og hjá so mongum øðrum hvalbingum hevur myrkrið í náminum í Prestfjalli drigið. Tað vóru

teir, sum betur dámdu spenningin í Prestfjalli enn tað, sum er at uppliva – í millum aldubrot - á havinum. Men so var ikki hjá Regini.

Í 1962 var tolið uppi; 17. apríl mynstraði hann við trolaranum Brandi Sigmundarsyni. Har fekk hann sínar fyrstu royndir á sjónum í millum trolaramenn - tað, sum hann í mong ár hevði tráað eftir og sæð fram til. Og tað vísti seg eisini skjótt, at hann ikki hevði gjørt nakra roknivillu; dreymurin og veruleikin sampakkaðu væl.

Men skjótt kom hann eftir, at á brúnni var útsýnið betur enn á dekkinum, tí var næsti leikur í talvinum lættur at flyta. 15. september 1967 mynstraði hann av Brandi Sigmundarsyni og søkti um upptøku á Føroya Sjómansskúla, sum tók væl í móti umsóknini. Tá tók stýrimansútbúgvingin 1½ ár, og í apríl 1970 fekk hann skipsførarapróg v í hondina, og takkaði fyri seg á Føroya Sjómansskúla.

So nú skuldi lærdómurin standa sína roynd. Um hetta mundi høvdu vágbingar keypt ídnaðartrolaran Bjarnoy. Har fekk Regin sína fyrsta "tjans" sum navigatørur.

Teir fóru beinleiðis til fiskiskap í Norðsjógvin á ídnaðarveiðu. Við hesum skipi var Regin stýrimaður til komið var inn í februar 1972.

Hjá teimum sum balast á havinum leita tankarnir javnan heim til konu og børn; har er altíð ein saknur. So var eisini hjá Regini. Eitt stutt tíðarskeið var hann heima, til hann í mai 1973 mynstraði við ídnaðartrolaranum Gudmundi. Hetta vóru góð ár hjá ídnaðartrolarunum; Regin sigldi við Gudmundi sum stýrimaður árini 1973-1979.

Á sumri 1980 søkti Vaktar- og Bjargingartænastan eftir navigatøri. Hóast bert talan var um avloysarastarv so søkti Regin og mynstraði sum 1. stýrimaður við Tjaldrinum, og fekk soleiðis eisini innlit og royndir við einum skipi við stórari ábyrgd og stórum myndugleika.

Tann 1. mai 1981 legði hann leiðina niður til Fredericia. Har mynstraði hann við oljuskipinum Magn, sum Shell júst tá hevði ognað sær. Magn kom at lasta í Mongstad í Norra, og sigldi haðani til Føroya við olju. Við Magn kom Regin at sigla sum yvirstýrimaður og skiparaavloysari til á sumri 1983.

Sama ár gjørdist hann virkin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Í 1984 varð hann valdur í nevnd felagsins, har hann hevði sæti sum nevndarlimur og næstformaður til aðalfund felagsins í 2013, tá hann ikki ynskti afturval.

Men hann hevur eisini røkt aðrar uppgávur fyri felagið.

Í 1986 var tørvur á einum roknskaparkønum manni á skrivstovu felagsin. Umframt kunnleika til bókhald og roknskap var eisini neyðugt at hava kunnleika til sáttmálaviðurskiftini hjá felagnum. Hetta starv tók Regin upp á seg, og hevur við nærlagni og dugnaskapi, røkt hetta starv til seinasti roknskapur hansara var lokin stutt fyri, at hann andaðist.

Okkara tankar leita til tykkum sum hava mist mann, pápa og abba, má Harrin styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.





Vinnukundadeildin í Eik

Tryggja tær arbeiðsfrið

Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.

Hilmar er vinnukundaráðgevi í Eik. Sum partur av fiskivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum. Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.

www.eik.fo tel. 348000

tekstur: **Øssur Winthereig** *-PRESS*



Gassatangaskipið Meridian Spirit lá í Nólsoyafirði í ein mánaða. Ein av grundunum er, at kravið til svávul-dálking í Føroyum er lægri enn i Norðsjónum, har skipið fyrr hevur ligið. *Mynd: Anna Katrina Højgaard*

# Føroyar hýsa dálkandi skipum

**Markvirðini í Føroyum fyri, hvussu nógv svávul kann vera í brennioljuni hjá skipum gera, at tað loysir seg at betur at bíða í Nólsoyarfirði enn í td. Norðsjónum.**

Stóra gasstangaskipið Meridian Spirit lá seinnu helvt av februar til síðst í mars fyri teymi í Nólsoyarfirði. Skipið er fast knýtt at einum natúrgassverkið í Hammerfest í Norðurnorra.

- Vit liggja vanliga og bíða millum túrur og hesiferð bleiv tað so í Føroyum, sigur Dánjal Pauli Lisberg, sum var skipari, tá teir ankraðu í Nólsoyarfirði. Ein annar føroyingur Jónsvein Mikkelsen fór síðani umborð, sum skipari.

Skipið er eitt LNG-skip, sum siglir við flótandi gassi úr Hammerfest til støð kring allan heim. Meridan Spirit er eitt av 6-8 skipum, sum eru knýtt at verkinum í Hammerfest. Tey eru tryggjað eitt ávíst túratal um árið, men tað kann vera ymiskt, nær teir fella og hvussu teir verða lagdir til rættis.

Skipið lá í Nólsoyarfirði og bíðaði eftir nýggjum túri. Umframt føroysku skipararnar er Dávur Juul maskinsjefur og Jóhan Petur Joensen yvirstýrimaður. 24 mans eru við skipinum.

Meridian Spirit er 285 metrar langt og 44 metrar breitt.

### Krøv til svávulinnihald

Meridian Spirit brennir tungolju og krøvini til, hvussu nógv svávul loyvt er at hava í oljuni eru ymisk kring knøttin. Tað er IMO – altjóða skipaferðslufelagskapurin – sum ásetur, hvørji krøv eru galdandi fyri skip, sum sigla á heimsins høvum. So skal hvørt land sær seta lógir í gildi, sum fylgja IMO-krøvunum.

Kravið frá IMO til svávul-innihaldið í oljuni er, at tað í mesta lagi mugu vera 3,5% av svávul í, men IMO hevur eisini lýst nøkur øki, sum serlig umhørvisøki á sjónum – tey sonevndu SECA-økini. SECA-økini eru eitt nú Norðsjógvurin Eystursjógvurin og leiðirnar uttanfyri USA og Kanada.

Í fyrsta lagi var kravið til skip, sum sigla í SECA-økjum, at loyvi var ikki at brúka olju, sum hevði meiri 1% av svávul í, men 1. januar í ár var kravið lækkað til 0,1%. Um skipini ikki fylgja hesum krøvum, skuldu tey hava útgerð at reinska roykin, sum kemur úr skorsteininum – sonevndar skrubbarar, ið reinska roykin við sjógvi.

Føroyar eru ikki við í SECA-økinum og tí eru vanligu reglurnar hjá IMO galdani í føroyskum sjóøki. Tað er í mesta lagi 3,5 % av svávul í oljuni. Tað er ein av orsøkunum til, at Meridian Spirit hevur ligið í Nólsoyarfiriði og bíða eftir túri. Áður hevur Meridian Spirit ligið í Norðsjónum og bíða.

Orsøkin til strangaru krøvini um svávul-innihaldið er dálkingarvandin. Í SECA-økjum sigla nógv skip og har býr nógv fólk.

### Ikki heilsuvandi enn

Anni á Hædd í Fiskimálaráðnum sigur, at føroysku myndugleikarnir ikki hava ætlanir um at seta strangari krøv í verk, fyrr enn IMO boðar frá, at nú verður markið broytt í altjóða høpi.

- Føroyski politikkurin er at verða til reiðar at seta nýggju reglurnar í verk, tá boðini koma frá IMO, sigur Anni á Hædd. Anni á Hædd vísir á, at tær kanningar, sum eru gjørdar í landi í Føroyum av dálkingini, sum stendst av svávul, ikki vísa virði, sum geva heilsuvanda.

Kortini eru tað ikki ein heilt fremmandur tanki, at Føroyar kundu verið undangonguland og setti strangari krøv.

- Men so hevði tað meiri verið fyri at víst solidaritet fyri globala umhvørvinum, sigur Anni á Hædd.

Hon væntar ikki, at vit í framtíðini fara at síggja fleiri hundrað skip í Nólsoyarfirði, tí her ber til at liggja og brenna olju eftir hægru markvirðunum.

### Trupult eftirlit

Higartil hevur verið sera trupult at hava eftirlit við, um skip halda ásettu markvirðini. Í dag verður svávulinnihaldið í brennioljuni kannað við stakroyndum av oljurokningunum og einstakar ferðir við evnafrøðiligum kanningum av brennioljuni, tá skipið liggur inni.

Hildið verður ikki, at hetta eftirlitið er nóg gott og leita verður eftir nýggjum eftirlitsmátum.

Í Danmark verður arbeitt við at seta serligar følarar undir Stórabeltsbrúnna og Oyrasundsbrúnna, sum kunnu máta roykin frá skipunum, sum sigla undir brúgvarnar. Ein slík skipan hevði verið eins fyri øll reiðarí og øll skip.

ES-londini umhugsa eisini at krevja, at skipini hava egna mátiútgerð umborð, har virðini kunnu avlesast.

### Svávul á landi

Krøv eru eisini til virki á landi, sum brenna tungolju. Í Føroyum brenna SEV og Havsbrún tungolju, og tá er tað Umhvørvisstovan skal geva umhvørvisgóðkenningar.

Eitt av krøvunum, sum Umhvørvisstovan setur til virkini, er at oljan má ikki hava meiri enn 1% av svávul í. Tað er sama mark, sum var galdandi fyri skip í SECA-økjunum til 1. januar í 2015.

tekstur: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*




Norrøna hevur seks sonevndar skrubbarar í skorsteininum, sum reinska roykin áðrenn hann fer upp í luftina. mynd: **Eileen Sandá.**

# Norrøna fremst í heiminum

## Saman við einum suðurkoreanskum felag, hevur Norrøna ment eina reinskiskipan, sum reinskar svávul úr roykinum, áðrenn hann fer upp í luftina

Norrøna silgir upp á tungolju, har svávulvirðið er yvir 0,1%. Hetta merkir at sonevndu SECA-krøvini eru galdandi fyri Norrønu, tá hon siglur til Hirthals.

Fyri tveimum árum síðani keypti Smyril-line sonevndar skrubbarar, at seta í skorsteinin. Seks skrubbarar ein til hvønn motorin. Útgerðin reinskar roykin við at lata hann gjøgnum sjógv, sum knýtur svávuli at sær, so roykurin verður so at siga svávulfríur, tá hann verður sleptur upp úr skorsteininum. Útgerðin var keyp frá suðurkoreanska felagnum STI, sum í nøkur ár hevði arbeitt við at menna skipanina og hava roynt hana á einum minni skipi í Suðurkorea.

Norrøna er fyrsta skip í heiminum, sum búkar hesa útgerð frá STI á handilsligum grundarlagi.

- Vit hava ment skipanin saman við suðurkoreanska felagnum, og vit vænta at fáa endaliga góðkenning frá klassanum í næstum, sigur Rúni Olsen, maritimur stjóri á Smyril Line.

Rúni Olsen er ikki sørt errin av, at Smyril Line gongur á odda í heiminum.

- Vit eru nú so frammalaga, at vit verða bidnir at luttaka á ráðstevnum fleiri staðni og greiða frá okkara skrubbaraloysn umborð á Norrønu, sigur Rúni Olsen.

### Sløkkja skrubbararnar

Íløgurnar í skrubbararnar eru stórar, men kortini er tað væl bíligari enn, um Norrøna skuldi farið at siglt við disel ella gassolju.

Men tað kostar eisini at hava skrubbarnar gangandi, tí pumpur skulu koyra og ymisk evni skulu setast til. Tað merkir, at reinskiútgerðin bert koyrir, tá Norrøna siglir í SECA-øki, har herdu krøvini eru galdandi. Á túrunum til Íslands verður útgerðin sløkt.

– Vit hava ikki enn avgjørt, um útgerðin skal koyra alla tíðina, men vit eru nú fyrireikaðir til 2020, tá nýggj krøv koma í øllum heiminum, sigur Rúni Olsen.



**Poul Henning Poulsen**, skipssførara-aspirantur stendur saman við skrubbaraútgerðini umborð á Norrønu. mynd: **Rúni Olsen**



Nógvir manglar vóru í millum annað trygdarvenjingunum á m/s Anitu. *Mynd: Kiran Jóannesarson*

# Eftirlitsvitjan á m/s Anitu vísti stórar manglar

**Av og á ger Sjóvinnustýrið eftirlit av trygdarvenjingum umborð á skipum í føroyska flotanum. Á nøkrum skipum er skilið gott, men á øðrum stendur illa til. Eftirlitið umborð á Anitu í februar í 2014 vísti eina syndarliga støðu.**

Vit fara niðan fyri at taka fleiri brot úr einari eftirlitsfrágreiðing, sum Sjóvinnustýrið gjørdi umborð á Anitu hin 28. februar í 2014. Hetta var eftir syndarligu vanlukkuna 11. februar í fjør, tá 34 ára gamli indonesin Saefudin sló út av skipinum og ikki kom afturíaftur.

Sambært frágreiðingini hjá Sjóvinnustýrinum skal skiparin umborð á Anitu í neyðstøðum taka við leisluni á brúnni. Men staðfest varð í eftirlitinum, at teir báðir føroysku skipararnir vóru alt ov afturhaldandi við at átaka sær hesa leiðsluábyrgd. Skiparin gav ongi greið boð til manningina - hvørki beinleiðis ella umvegis hátalaraskipanina, um slagið av neyðstøðu ella nágreiniliga hvar umborð á skipinum simuleraða neyðstøðan var.

Hetta hevði millum annað við sær, at manningin undir fyrru brandvenjingini fór á skeivt stað at sløkkja ein simuleraðan eld. Skiparin tryggjaði sær ikki á nøktandi hátt, at uppgávurnar sambært avvarðandi rullu vórðu fylgdar, og gav ikki á nøktandi hátt ítøkilig boð og vegleiðing til teirra, sum vóru partar av avvarðandi mynstringarrullu. Skiparin tryggjaði sær heldur ikki á nøktandi hátt, at

tekstur : **GRÆKARIS D. MAGNUSSEN** -*PRESS*

manntal varð hildið yvir teir persónar, sum skuldu møta á brúnni. Teir báðir føroysku skipararnir hildu seg meira í bakgrundini, og lótu í staðin sponsku stýrimenninar leiða venjingina og samskifta við manningina.

Tað var serliga spanski 2. stýrimaður, sum í verki tók leiðsluna á venjingunum.

Samskiftið millum føroysku skiparanar og sponsku yvirmenninar, sum aftur samskiftu við indonesisku manningina, tóktist alt ov ógreitt.

**Onki felags arbeiðs-/trygdarmál**

Í frágreiðingini hjá Sjóvinnustýrinum varð staðfest, at onki felags arbeiðsmál er samtykt, skrásett ella verður brúkt umborð á Anitu. Venjingarnar góðu greiðar ábendingar um, at manningin hevur trupulleikar við samskiftinum, og at hetta tók ov langa tíð og førdi til misskiljingar. Samskiftið umborð á Anitu skal gjøgnum fýra lið, føroyskt, enskt, spanskt og indonesiskt. Og so øvugtan vega aftur. Máltrupulleikarnir eru helst eisini ein av orsøkunum til, at føroysku skipararnir ikki vóru so aktivir undir venjingunum. Mynstringarrullurnar umborð á Anitu eru á føroyskum og enskum máli, hóast meginparturin av indonesisku manningini skilur lítið ella onki av enskum.

**Vantandi kunnleiki til alarmskipanir**

Bæði føroysku skipararnir og sponsku yvirmenninir tóktust kenna ov lítið til alarmskipanirnar umborð, bæði hvat viðvíkur staðseting av alarmunum og hvørjar knøttar, teir skuldu trýsta á. Spurdir, svaraðu báðir skipararnir, at Anita ikki hevði nakran "general-alarm", og at tað tí bara kundi gevast sama alarmsignal, uttan mun til slagið av neyðstøðu. Spanski 1.-stýrimaðurin kundi tó vísa á general-alarmin, og hesin riggaði sum hann skuldi.

Eftirlitið hjá Sjóvinnustýrinum vísti eisini manglandi kunnleika til mynstringarrullurnar (brand-, báta- og MOB-rulluna).

"Bæði skiparar, styrimenn og manningin annars tóktust ikki at hava nóg neyvan kunnleika til hetta, hóast teir søgtu seg hava vant dagin fyri og hóast 2. stýrimaðurin gjøgnumgekk rullurnar fyri manningini, beint áðrenn einstøku venjingarnar vórðu hildnar undir eftirlitsvitjanini," skrivar Sjóvinnustýri í frágreiðingini.

**Ónøktandi manntal**

Nøktandi manntal varð ikki hildið til nakra av venjingunum. Onki sjónligt samskifti var ímillum skipara og tann, sum hevði ábyrgdina av manntalinum, og tað varð ongantíð alment staðfest, at øll manningin var møtt á brúnni, tá alarmurin hevði ljóðað. Ikki fyrr enn eftirlitsfólkini frá Sjóvinnustýrinum beinleiðis spurdu eftir manntalinum, var hetta kvitterað av einum av stýrimonnunum umvegis indonesiska kokkin, sum hevði hesa uppgávuna sambært mynstringarrullunum.

Vegna ógreið boð frá skipsleiðsluni vórðu tvær brandvenjingar hildnar.

Seinna brandvenjingin: Bara ein av manningini kom á brúnna eftir at alarmurin hevði ljóðað. Ikki fyrr enn brandalarmurin varð settur í gongd á øðrum sinni, komu fleiri av manningini upp á brúnna. Onki skipað manntal varð hildið, og tí bar ikki til at staðfesta, um øll manningin møtti. Boðini um, hvar eldurin var, komu hesa ferð fram frá føroyska skiparanum umvegis spanska 2. stýrimannin, men tað varð ongantíð almannakunngjørt fyri allari manningini, hvat neyðstøðan var, og hvar eldur var í.

Undir báðum brandvenjingunum vóru trupulleikar við trýstinum á brandslangunum. Pumpurnar fingust bara at rigga á "low-speed". Hol var eisini í einari brandslangu.

**Bátavenjing**

Her møtti manningin á brúnni stutt eftir alarmin, men av vantandi skipaðum manntali kundi ikki við vissu staðfestast, at allir vóru møttir.

Anita hevur 2 sløg av bjargingardraktum. Annað slagið hevur ikki nóg mikið av uppdrift, og tí krevur hon eisini bjargingarvest, sum hóskar til bjargingardraktina. Hetta vistu hvørki yvirmenn ella manning. Men øll manningin lat seg í draktirnar upp á nøktandi tíð.

Bjargingarvestarnir liggja í kømrunum, men kanningin vísti, at teir vóru ov stórir til bjargingardraktirnar.

Anita hevur ongar sprinklarar í ruminum, har pakningur verður goymdur (serføroyskt krav eftir Hercules vanlukkuna). Sprinklarar skulu installerast, men tá pakkirúmið ikki er inni í sjálvum skipinum, men "fríttliggjandi og úti" á ovasta dekki, verður givin ein 3 mánaðar freist til at faa hetta gjørt.

**"Samskiftið umborð á Anitu skal gjøgnum fýra lið, føroyskt, enskt, spanskt og indonesiskt"**

**Neyðstýring**

Yvirmenninir vórðu bidnir at simulera eina neyðstýring frá maskinrúminum. Hvørki skiparar ella stýrimenn tóktust kenna til neyðstýringina og hvussu hetta kundi gerast i verki (hetta skal annars venjast 3. hvønn mánaða). Spanski maskinmeistarin tóktist tó kunnaður um neyðstýringina og kundi umvegis maskinrúmið vísa, at hetta riggaði í verki. VHF varð nýttur at samskifta millum brúgv og maskinrúm.

Anita hevur heilivágskistu B umborð og galdandi tilhoyrandi hefti til B-kistuna. Galdandi útgáva av "Søfartsstyrelsens lægebog" er umborð, men ikki í enskari týðing, sum annars er krav, tá manningin ikki tosar ella skilir danskt mál.

**Venjingar**

Niðurstøðan hjá Sjóvinnustýrinum er, at verandi mynstringarrullur mugu venjast meira, so skipari og manning nágreiniliga kenna sín leiklut í neyðstøðu samsvarandi mynstringarrullunum, duga at brúka og skyna á ymisku alarmsignalini, og at samskifta á nøktandi hátt. Um rullurnar verða broyttar og/ella manningin heilt ella lutvíst verður broytt, skal venjast eftir nýggju rullununum. Sjóvinnustýrið skal boðsendast til eftirlitsvitjan, tá skipari og manning hava vant so mikið, at teir til fulnar kenna seg fortróligar við mynstringarrullurnar, stendur millum annað at lesa í frágreiðingini hjá Sjóvinnustýrinum. Ein frágreiðing, sum avdúkar eina rúgvu av manglum umborð á m/s Anitu.

tekstur og mynd: **INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*

BRENNIDEPILIN



# Jóhan Weihe

**Føddur:** 18. juni 1972

**Parlagsstøða:** Giftur við Anitu Højgaard, kostráðgeva, og saman eiga vit børnini Ólavur, 23 ár, Pætur, 15 ár, Anna, 10 ár, Tórunn, 5 ár, og Brandur, 8 mánaðir. Búgva í Hoyvík. Eisini havi eg fingið eina fitta abbadóttir, Drós, sum er 7 mánaðar gomul.

**Starv:** Starv: Maskinstjóri við veitingarskipinum Stril Mariner.

**Útbúgving:** Maskinmeistari frá Vinnuháskúlanum í 2004

**Hvussu heldur tú útlitini vera hjá maskinmeistarunum:**

Tey haldi eg vera góð, maskinmeistaraútbúgvingin er so breið, at ein, sum hevur fulla útbúgving, hevur ikki stórvegis trupulleikar at fáa starv annaðhvørt á landi ella á sjónum.

**Hvør er størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara í dag:**

Tað er at fylgja við tí tekniska, tí har broytist alt alla tíðina.

**Nær vart tú fyrstu ferð til skips og við hvørjum:**

Á sumri 2002 á Flemish Cap við Arctic Viking.

**Hvør var longsti túrur higartil til skips:**

Næstan fýra mánaðir í Grønlandi við innhandlaraskipinum Christian Høj – gamli Suðurvarði – sum Royal Greenland átti tá.

**Hvat gert tú í frítíðini:**

Brúki nógva tíð uppá børnini og í summarhúsunum við Gjógv.

**Hvat slag av bili hevur tú:**

Mitsubishi Outlander

**Hvat slag av teldu hevur tú:**

Toshiba.

**Hvør er besta bók, tú hevur lisið:**

Eg brúki ikki nógva tíð uppá at lesa bøkur.

**Hvønn sang/lag dámar tær best:**

Eg havi ikki nakran bestemtan sang/lag, men mær dámar væl Celine Dion.

**Hvør er besti filmur, tú hevur sæð:**

Eg brúki sera lítla tíð uppá at hyggja eftir filmi, men mær dámar væl at hyggja eftir dokumentarum í sjónvarpi.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**

At familjan og ikki minst børnini klára seg væl í tí dagliga.

**Hvat kann øsa teg í gerandisdegnum:**

At fólk ikki halda tað sum tey lova, millum annað politikarar – teir arbeiða bert eftir sínum egnum áhugamálum og ikki fyri, hvat er best fyri okkara land.







# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM skeið
- ERM skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA skeið
- ECDIS skeið
- Tecdis skeið
- SSO skeið
- § 16 skeið
- ISPS skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS skeið
- LRC skeið
- GOC skeið og endurnýggjan
- DP Basic/Induktion
- DP Advanced/Simulator
- AIS
- Tankers familarisation

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- Bátaføraraskeið
- Medisinsk fyrstahjálp

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum. Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

SENDISTOVAN



Annfinnur Garðalíð formaður

# BROT ÚR DAGBÓK

**19-01-2015.**
Fundur við Páll Nielsen viðv FG SSL.
Fyrireiking til sáttmálaupplegg FR (Fiskiskip)

**20-01-2015.**
Fyrireiking til sáttmálaupplegg FR (Fiskiskip)

**21-01-2015.**
Fundur í 4 mannanevndini. Fyrireika nýggja orðing til listan viðv. Allahalgunnardegi 1. Nov

**22-02-2015.**
Fundur hjá MF. Viðv FMU (Faroes Maritime Union)

**23-01-2015.**
Próvhandan á Vinnuháskúlanum.
26.-27.-28./1 og 1/2-2015. NNK (Nordisk Navigatørkongress) í Gøteborg.

**29-01-2015.**
Fundur á FSN. Fyrireiking til sáttmálaupplegg FR (Fiskiskip)

**30-01-2015.**
Fundur á FSN. Fyrireikan til sáttmálaupplegg FR (Fiskiskip)
Fundur í hølunum hjá MF. MF-FSN-FF. Fyrireiking til sáttmálaupplegg FR (Fiskiskip)

**02-02-2015.**
Ymist kontórarbeiði. (Fyrireikingar til pressufund)

**03-02-2015.**
Pressufundur á Hotel Føroyumn ar frágreiðingin um arbeiðsmegi uttanlands var løgd fram. Magni Laksáfoss legði fram.
Partarnir FSN-FR handaður hvørmum øðrum krøv í samband við sáttmálasamráðingar (Fiskiskip)

**04-02-2015.**
Blaðfundur í FSN. Mið & Magn.

**05-02-2015.**
Fundur í FSN, viðv sáttmálanum við FR (Fiskiskip)
Fundur í FSN , viðv. sáttmálauppleggi til FR (Farmaskip/Frálandavinnuna)
Handa krøv partana millum FSN-RFF. (Vinnuhúsið)

**09-02-2015.**
Fundur við RFF viðv nýggjum sáttmála. (Vinnuhúsið)
Fundur á FSN. Eftirmeting av fundi við RFF.

**10-02-2015.**
Ein dagur á kontórinum.

**11-02-2015.**
Fundur við Páll Nielsen advokat. Viðv sáttmálauppleggi frá RFF

**12-02-2015.**
Ein dagur á kontórinum.

**13-02-2015.**
Fundur við RFF á Vinnuhúsinum. Forhandla sáttmála. (Uttan úrslit)

**16-02-2015.**
Blaðfundur í FSN. Mið & Magn. Viðgera tilboð frá Press, um at standa fyri útgávuni av Mið & Magn.

**17-02-2015.**
Ein dagur á kontórinum.
Kl: 16.00 fundur á Kaffihúsinum við Lív3.

**19-02-2015.**
Fundur við FR-FSN. Tosa um sáttmálakrøvini. Annars tosa um ymist innan fiskivinnu, og framtíðar avtalur innan sáttmálar.
Fundur við PRESS. Undirskriva sáttmála við PRESS um útgávu av Mið & Magn.

**20-02-2015.**
Ein dagur á kontórinum.

**23-02-2015.**
Kl. 10:00 fundur á kontórinum, har vit gjørnumgingu sáttmálaupplegg viðv. sáttmálasamráðingum við FR.
Kl. 14:00. Sáttmálasamráðingar á Vinnuhúsinum við FR(Fiskiskip). Partarnir gjørnumgingu krøvini hjá hvørjum ørðum, tað var eingin loyna, at FR vóru ikki sinnaðir, at eftirlíka okkara krøvum.

**24-02-2015.**
Nevndarfundur nr 02.
Nevndarfundurin byrjaði kl 10:00. Fundur lokin kl 16:30

**25-02-2015.**
KL. 10:00. 1. november-nevndin kom saman. Hetta er aðru ferð vit koma saman, um at evna eitt uppskot til eina orðing av nær ein persónur skal koma á listan yvir sjólætnar føroyingar, sum skulu nevnast Allahalgunardagin.

**26-02-2015.**
Kl. 09:00. Samráðingarfundur við FR um nýggjan sáttmála fyri fiskiskip. FR spurdi um vit meintu tað í álvara viðv sáttmálakrøvunum. JA, SJÁLVANDI SVARAÐI EG. OG EINKI MINNI ENN TAÐ..

**27-02-2015.**
Havt fund við Skyn viðv. sølulysing av FSN húsinum, og undirskrivað søluavtalu við Skyn.

**02-03-2015.**
Samráðingarfundur millum FSN – RFF. Samráðingarnar ganga striltið, avtalað nýggjan fund.

**03-03-2015.**
Samráðingarfundur millum FSN – RFF. Samráðingarnar ganga alt annað enn gott, stór ósemja um reisudagar og null dagar. Avtalaðu nýggjan fund.

**04-03-2015.**
Eg bleiv bjóðaður av Søfartensledere til Odense á Generalforsamling. Eg fekk samstundis ein fund við Fritz og Per viðv. sáttmálum, og avtaluni millum SL og FSN. Kom heim aftur tann 06-03-2015.

**09-03-2015.**
Samráðingarfundur millum FSN – RFF. Byrjað bleiv kl 09:00 í Vinnuhúsinum. Fundurin endaði við semju, og 2 ára sáttmáli bleiv undirskrivaður.

**10-03-2015.**
Fundur millum FMA – FMU. Tosað var um Føroyska flaggið, og hvat gerðast kundi/skuldi fyri at fáa flaggið av Paris Mou. FMA ynskti at fáa FMU eina sjarmuferð til London, og fortelja, hví vit ikki eiga at vera á listanum fyri hentleika flagg
Blaðfundur vegna Mið & Magn. Blaðútgávan er byrjað.

**12-03-2015.**
Fundur í FMU
Fundur við Páll Nielsen viðv. SSL (Fasta gerðarættinum)

**18-03-2015.**
Fundur í Vinnuhúsinum millum FMU og RFF. Her bleiv tosað um, hvat gerast skuldi fyri at fáa føroyska flaggið av Foc listanum, partarnir vóru samdir um at seta eitt skriv saman, og tosast aftur.

# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum


Páll Hansen formaður

## BROT ÚR DAGBÓK

**19-01-2015. MF**
Føroya reiðarafelag og Maskinmeistarafelagið handaði hvørjum øðrum sáttmálakrøvini og gingu tey ígjøgnum.
MF hevði nýggju krøv til felagsreglunar og fýra til serreglur. Føroya Reiðarafelag hevði 14 krøv íalt.

**20-01-15. Trygdargrunnurin**
Nevndarfundur. Fimm mál á skránni millum annað fíggjarætlan fyri 2015 og nýggjastu tølini frá grunninum, hettar var næstseinasti fundur hjá hesum stýrinum.

**21-01-15. FSN**
Fundur millum nevndina í Mið og Magn og Press um at samstarv um blaðútgávu.

**22-01-15. MF**
Fundur millum FMU og FMS um sáttmálaviðurskifti viðvíkjandi "Jupiter" IMO 7113002. Tosað var um ognarviðurskiftini viðvíkjandi Jupiter og eru tey sera fløkjaslig. Skipið er skrásett í Charlestown, Saint Kitt sand Nevis. Skrásettur eigari er Excl International FZU í Sameindu Arabisku Emiratunum. Indarar eru eisini inni í myndini,manningin er russisk. Viðvíkjandi ognarskapi. Beneficial owner er Faroe Martritime Management (FMM) við Sundsvegin .

**23-01-15. Vinnuháskúlin**
Fyrrapartin. Próvhandan á skúlanum, góður og hugnaligur stemningur á skúlanum , nógv fólk samlað. Seinnapartin nevndarfundur. Kunnað var um fasta gerðarrættarmálið og SSL. Seks mál vóru til støðutakan, millum annað broytingar í manningarlógini, upplegg til sáttmála - Reiðarafelagið fyri Farmaskip og samráðingarnar fyri fiskiskip.

**27-01-15. MF**
Samráðingarfundur millum Føroya Reiðarafelag og MF. Á hesum fundi blivu krøvini hjá báðum pørtum gjøgnumgingin meira nágreiniliga. Sum heild ein góður fundur og avtalað bleiv at møtast aftur, tá MF hevði lagt krøvini fram við RFF.

**30-01-15. MF**
Fundur millum tey trý manningarfeløgini. MF ynskti at frætta frá hinum feløgunum, um tey eru klár at fara til samráðingar, og um man skuldi samráðast saman. Semja var um at satsa upp á eina felags framløgu av krøvum, men FSN var ikki klárt, og vit skuldu frætta aftur.

**04-02-15. FSN**
Tosa víðari við Press um komandi samstarv. Eftir hendan fundin var nevndarfundur. Har samráðingarnar við RFF blivu viðgjørdar og krøvini viðgjørd. Greitt bleiv á hesum fundi, at FSN ikki kom at samráðast saman við hinum feløgunum, sostatt var greitt, at FF og MF fóru at framleggja krøvini saman.

**06-02-15. Vinnuhúsið**
MF og FF handaði RFF sáttmálakrøvini, og vit móttóku teirra krøv, ein stutt gjøgnumgongd av krøvunum bleiv gjørd. Og avtalað bleiv at hittast aftur 11/2 Kl 09:00

**09-02-15. MF**
tuttur nevndarfundur, har umboð fyri FF eisini var við, krøvini frá RFF blivu gjøgnumgingin.

**11-02-15. Vinnuhúsið**
Fundur millum MF, FF og RFF. Fyrsta mál sum tosað bleiv um, var fráboðanarfreistin. MF undirskrivaði fráboðaðanina, men FF gjørdi greitt, at teir kundu ikki undirskriva hesa fráboðan og vísti til sáttmálan fyri fiskiskip. MF og RFF hildu síðani fram og komu ásamt um at skriva eina ávegis semju, partarnir fóru síðan hvør til sítt at umhugsa støðuna og hittast aftur.

**16-02-15. FSN**
Fundur millum nevndina í Mið og Magn og Press. Partarnir blivu samdur um at gera samstarvsavtalu.

**17-02-15. MF**
Triðji samráðingarfundur við Føroya Reiðarafelag. Komið varð meira ítøkiligt inn á krøvini hjá hvørjum øðrum, semja bleiv eisini um nøkur av krøvunum, sum heild ein góður fundur.

**18-02-15. Vinnuhúsið**
Partarnir gjøgnumgingu ávegis semjuna, semjan bleiv síðan undirskrivað við smávegis broytingum. Partanir samdir um at fáa hana innskrivaða í sáttmálan og fáa lønartalvurnar dagførdar.

**19-02-15. FSN**
Blaðfundur. Undirskrivaðu samstarvsavtalu við PRESS og avtalaðu greinar til komandi blað.

**25-02-2015. MF**
Fjórði samráðingarfundur. Partur av fundinum bleiv brúktur til at gjøgnumganga, hvussu støðan hjá pørtunum er viðvíkjandi teimum ymisku krøvunum.

**27-02-2015. MF**
Nevndarfundur. Tvey mál til kunningar: Broytingar í Mið og Magn og títtleiki maskinist. Fimm mál til støðutakan. Millum annað komandi NMF fundur og ráðstevna á Christianborg. Sáttmálasamráðingar og aðalfundur.

**02-03-2015. MF**
Fimti samráðingarfundur. Á hesum fundi blivu teir flestu skipabólkarnir gjøgnumgingnir, tað hevur gingið rímiliga væl, so nú nærkast endanum.

**05-03-2015. Als-húsið**
Síðsti fundur hjá sitandi stýri í trygdargrunninum, á skránni góðkenning av ársroknskapi, grannskoðanarprotokoll fyri
2014 o.a.

**07-03-2015. Aðalfundur**

**09-03-2015.Sjóvinnustýrið**
Fundur millum umboð fyri SVS og FMU. SVS greddi frá fundi teir høddu haft við ITF í London. Um at fáa flaggið av FOC listanum. Spurt bleiv um FMU ikki kundi fara á ein charmtúr fyri at royna at ávirka støðuna.

**10-03-2015. FSN**
Vanligur blaðfundur Mið og Magn.

**11-03-15. MF**
Sætti samráðingarfundur. Fundurin gekk væl, semja var um at skriva eina ávegis semju um tað, sum man higartil er vorðin samdur um.

**12-03-15. MF**
Fyrrapart nevndarfundur í FMU. Semja var um at biðja um fund við RFF og finna fram til teirra støðu í samband við FOC. Seinnapart fundur á skrivstovuni hjá Páll Nielsen, saman við hinum feløgunum um kærurit til Fasta Gerðarrættin um jóladag og langafríggjadag.

**13-03-15. Vinnuháskúlin**
Prógvhandan. 19 fingu handa maskinistprógv 1 kvinna og 18 mannfólk sum altíð ein sera hugalig løta á skúlanum.

**18-03-15. Vinnihúsið**
Fundur millum FMU og Reiðarafelagið fyri farmaskip um, hvussu sleppast kann av FOC listanum. Semja var um, at FMU tekur samband við ITF.

**20-03-15. MF**
Nevndarfundur. Kunna bleiv um Fasta gerðarrættar og SSL. Eisini bleiv næstformaður valdur og málsøki býtt, millum nevndarlimirnar.

**26-03-15. MF**
Sjeyndi samráðingarfundur við Føroya reiðarafelag. Ein sera konstruktivur fundur, báðir partar hava eitt forstáilsi av, hvussu komandi sáttmáli skal síggja út, tó er onkur skipabólkur ikki liðugt viðgjørdur. Og vit mangla at viðgera tær greinar, sum vit hava felags við hini feløgini.

# FØÐINGARDAGAR

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Egil Simonsen, Hoyvík | 30/1-1935 | 80 ár |
| Karl Mikkelsen, Sørvágur | 21/1-1945 | 70 ár |
| Sámal J. Olsen, Klaksvík | 4/2-1945 | 70 ár |
| Dánjal Jacob Poulsen | 5/2-1945 | 70 ár |
| Jóannes Lassen, Klaksvík | 14/2-1945 | 70 ár |
| Olevinus Sørensen, Viðareiði | 16/3-1945 | 70 ár |
| Jóhan Elias Hansen, Runavík | 26/7-1945 | 70 ár |
| Marius Hansen, Saltangará | 13-01-1955 | 60 ár |
| Kjartan Sigmar Kjartansson, Norðagøta | 17-01-1955 | 60 ár |
| Jóannes Djurhuus, Hvalvík | 18-01-1955 | 60 ár |
| Helgi Vestergaard, Tvøroyri | 25-01-1955 | 60 ár |
| Jóhan Petur Kjartansson Hentze, Sandur | 04-02-1955 | 60 ár |
| Hjallgrím Vestergaard, Froðba | 09-03-1955 | 60 ár |
| Rói Strøm, Bergen N | 01-04-1955 | 60 ár |
| Tummas Christoffersen, Vestmanna | 07-04-1955 | 60 ár |
| Høgni við Rætt, Saltangará | 23-05-1955 | 60 ár |
| Bjarni Góðadal, Sørvágur | 25-05-1955 | 60 ár |
| Heini Reinert, Leirvík | 31-05-1955 | 60 ár |
| Poul S. Olsen, Hvannasund | 08-06-1955 | 60 ár |
| Virgar Oknadal, Skopun | 22-06-1955 | 60 ár |
| Karl M. Joensen, Morkranes | 15-07-1955 | 60 ár |
| Jákup Eli Eidesgaard, Eiði | 16-07-1955 | 60 ár |
| Kristian Hansen, Nólsoy | 30-07-1955 | 60 ár |
| Joen Jacob Jacobsen, Klaksvík | 31-07-1955 | 60 ár |
| Hendrik Olsen, Skálavík | 31-07-1955 | 60 ár |
| Torry Thomsen, Sumba | 11-01-1965 | 50 ár |
| Páll Nielsen, Hvalba | 12-01-1965 | 50 ár |
| Karl Martin Niclasen, Tórshavn | 15-01-1965 | 50 ár |
| Árant Petersen, Sørvágur | 23-01-1965 | 50 ár |
| Ivan B. Holm, Nólsoy | 28-01-1965 | 50 ár |
| Martin Petersen, Tórshavn | 30-01-1965 | 50 ár |
| Hjartvard Hansen, Signaboður | 07-02-1965 | 50 ár |
| Fríður Ellendersen, Hvalba | 11-03-1965 | 50 ár |
| Eyðstein Wardum, Kollafjørður | 07-04-1965 | 50 ár |
| Bergur Eliasen, Tórshavn | 20-04-1965 | 50 ár |
| Elias Jacobsen, Sørvágur | 03-05-1965 | 50 ár |
| Jógvan Jacobsen, Skopun | 06-05-1965 | 50 ár |
| Svenn Rói Højgaard, Strendur | 08-05-1965 | 50 ár |
| Ingi Sigurðson, Klaksvík | 17-05-1965 | 50 ár |
| Hjaltur Poulsen, Klaksvík | 18-05-1965 | 50 ár |
| Ólavur Ólason, Poulsen Leirvík | 18-05-1965 | 50 ár |
| Rúni Jacobsen, Saltangará | 27-06-1965 | 50 ár |
| Líggjas Joensen, Nes, Eysturoy | 30-07-1965 | 50 ár |
| Trygvi Petersen, Glyvrar | 11-02-1975 | 40 ár |
| Ísak Petersen, Viðareiði | 26-02-1975 | 40 ár |
| Ási Potts, Esbjerg V. | 07-03-1975 | 40 ár |
| Kenneth S. Bech, Vágur | 10-03-1975 | 40 ár |
| Rói Arabo, Oyrarreingir | 19-03-1975 | 40 ár |
| Bergur Petersen, Klaksvík | 02-04-1975 | 40 ár |
| Hans Martin á Regni, Toftir | 26-04-1975 | 40 ár |
| Arngrím Hansen, Syðrugøta | 29-04-1975 | 40 ár |
| Heri Joensen, Klaksvík | 29-04-1975 | 40 ár |
| Ólavur Hansen, Klaksvík | 30-04-1975 | 40 ár |
| Finn Miðalberg, Norðdepil | 01-05-1975 | 40 ár |
| Johan Simonsen, Klaksvík | 01-05-1975 | 40 ár |
| Jákup A. Høgnesen, Klaksvík | 14-05-1975 | 40 ár |
| Símin Høgnesen, Húsar | 14-05-1975 | 40 ár |
| Klæmund Ovason, Johannesen, Hov | 26-05-1975 | 40 ár |
| Jørgen Nielsen, Norðagøta | 22-06-1975 | 40 ár |
| Lena Hallgren, Hoyvík | 07-07-1975 | 40 ár |
| Karl L. Thomassen, Kollafjørður | 07-07-1975 | 40 ár |
| Kristian S. Dam, Streymnes | 18-07-1975 | 40 ár |
| Hans Anders Jacobsen Nes, Eysturoy | 07-01-1985 | 30 ár |
| Martin Mohr í Grund, Syðrugøta | 30-03-1985 | 30 ár |
| Niklas Restorff Jacobsen, Tórshavn | 29-04-1985 | 30 ár |
| Ove Frederiksen, Ánir | 03-06-1985 | 30 ár |
| Kári í Kongsstovu, Haraldssund | 08-06-1985 | 30 ár |
| Andrias Vang Højgaard, Hoyvík | 15-06-1985 | 30 ár |
| Durita Christophersen, Tórshavn | 25-07-1985 | 30 ár |

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Mogens Højsted, Klaksvík | 03-05-1945 | 70 ár |
| Erland Joensen, Tórshavn | 24-07-1945 | 70 ár |
| John Højsted, Hoyvík | 15-01-1955 | 60 ár |
| Petur Sivertsen, Hoyvík | 01-02-1955 | 60 ár |
| Poul Karstin Klein, Skáli | 15-03-1955 | 60 ár |
| Henning Henriksen, Tórshavn | 13-05-1955 | 60 ár |
| Eyðun á Kósini, Klaksvík | 18-03-1965 | 50 ár |
| Rúni Nielsen, Vestmanna | 19-03-1965 | 50 ár |
| Herluf Johansen, Argjum | 08-04-1965 | 50 ár |
| Jens Lydersen, Miðvágur | 13-04-1965 | 50 ár |
| John Eli Krosslá, Porkeri | 16-04-1965 | 50 ár |
| Jóan Pauli Jacobsen, Gøtu | 30-04-1965 | 50 ár |
| Esmar Fjallstein Petersen, Saltangará | 20-06-1965 | 50 ár |
| Eyðfinn Johannesen, Skála | 25-06-1965 | 50 ár |
| Thomas Petur Askham, Tvøroyri | 30-06-1965 | 50 ár |
| Dan Samuelsen, Fuglafirði | 30-07-1965 | 50 ár |
| Júst Svínoy, Argjum | 25-02-1975 | 40 ár |
| Klæmint Mittún, Tórshavn | 28-02-1975 | 40 ár |
| Sjúrður Kunoy, Klaksvík | 30-04-1975 | 40 ár |
| Fríðrikur Løksagarð Absalonsen, Klaksvík | 15-01-1985 | 30 ár |
| Poul Jacob Poulsen, Klaksvík | 29-01-1985 | 30 ár |
| Jóhan S. Poulsen, Saltangará | 06-02-1985 | 30 ár |
| Rói Simonsen Patursson, Tórshavn | 25-03-1985 | 30 ár |
| Thorstein Vang, Klaksvík | 20-06-1985 | 30 ár |
| Frank Joensen, Klaksvík | 26-06-1985 | 30 ár |
| Dánial Gunnarson Nolsø, Tórshavn | 01-07-1985 | 30 ár |
| Pætur Rein Jensen, Tórshavn | 05-07-1985 | 30 ár |

VANLUKKUTRYGGING

trygging.fo



# **Eingin veit** á morgni at siga, hvar hann á **kvøldi gistir**



**Vanlukkutryggingin fevnir um flestu vanlukkur, skaðar og óhapp, ið tú kanst koma út fyri.**
Eitt nú kann nevnast likamsskaðar av ymiskum slag, tannskaði, miss av likamsluti o.s.fr.

Vel millum **Frítíðarvanlukkutrygging**, sum bara tryggjar teg í frítíðini ella **Heiltíðarvanlukkutrygging,** sum er galdandi alt samdøgrið.

AVSLÁTTARSKIPAN

Betri tú ert tryggjaður - **størri avsláttur**




**Fá upp til 32% í avsláttri**

**Set teg í samband við okkum** á telefon 345 600 ella tf@trygging.fo og tekna vanlukkutrygging.

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

LÍV er høvuðsstuðul hjá Rescue LÍV

# LÍV ger teg tryggari á sjónum




## Manningin á Rescue LÍV mælir til, at tú fylgir hesum leisti, um tú kemur í havsneyð:

1. Gev boð gjøgnum **VHF rás 16.**
   - Um hetta ikki ber til so ring: **1-1-2** (alarmsentralin)
   - Eisini ber til at ringja: **35 13 00** (MRCC)
   - Uppgev altíð eitt fartelefonnummar

2. Lurta á VHF rás 16 og hav fartelefonina tøka
   - So fáa vit samskift við teg



Jens Hansen
*Umsjónarmaður á Rescue Lív.*